# Ársfrásøgn 2008
# fyri
# UMHVØRVISSTOVUNA



# Innihaldsyvirlit


| | |
|---|---|
| Samandráttur | 3 |
| Skrivstovusamskipan | 5 |
| Kort & Skráir | 19 |
| Lendi | 29 |
| Vernd | 37 |
| Gransking | 49 |
| Viðarvøkstur & Frílendi | 52 |
| Fylgiskjal 1 | 59 |
| Fylgiskjal 2 | 60 |
| Fylgiskjal 3 | 61 |

# Samandráttur

Umhvørvisstovan varð sett á stovn 1. juni 2007, tá seks ymiskir stovnar og virkisøki innan náttúru-, umhvørvis- og lendisviðurskifti vóru savnað undir felags stjóra. Árið 2008 er fyrsta heila virksemisárið hjá stovninum, og er ætlanin við hesi frágreiðing at geva eina lýsing av tí virksemi, sum er farið fram í árinum.

Árið hevur í stóran mun verið merkt av samanleggingini av teimum 6 stovnunum og virkisøkjunum: Tinglýsingarstova, Matrikulstova, Landsfólkayvirlit, Skógrøkt landsins, Náttúrugripasavn og  Umhvørvisdeildin á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Felags arbeiðsstøði og skipan av stovninum var viðgjørt liðugt í 2007, og varð sostatt 2008 árið, har starvsfólk fysiskt fluttu saman, og nýggjar skipanir skuldi innarbeiðast. Nýggi leiðslubólkurin varð mannaður miðskeiðis í árinum.

Í februar flutti starvsfólkið frá umhvørvisdeildini á Heilsufrøðiligu starvsstovuni inn á Umhvørvisstovuna. Eisini var ætlanin at starvsfólk frá Náttúrugripasavninum, sum hildu til í Fútalág, skuldu flyta. Tað vísti seg tó, at starvsfólk á Náttúrugripasavninum ynsktu at útseta flytingina og síðan at koma úr aftur samanleggingini. Teirra ætlan um flyting var tí steðgað. Starvsfólk innan tinglýsing fluttu út á Umhvørvisstovuna í mai, tá farið var undir nýggja føroyska digitala tinglýsingarskipan.

Ætlanirnar um útskiljing av Náttúrugripasavninum vóru sera óhepnar fyri nýskipanargongdina hjá stovninum og ætlanir um uppbygging av náttúruverndarfyrisiting. Ynski fekk politiska undirtøku, og út á summarið varð staðfest, at Náttúrugripasavnið aftur skuldi skipast sum sjálvstøðugur stovnur.

Stovnurin hevur arbeitt við at gera týðandi broytingar í matrikullóggávu og býarskipanarlóggávu. Eisini er arbeitt við kunngerðum, m.a. innan regulering av gjøldum. Ymisk kærumál hava verið viðgjørd, serliga viðvíkjandi sundurbýti. Um okkara samskifti við Føroya Kærustovn staðfestir kærustovnurin í sínum hagtølum fyri 2008, at Umhvørvisstovan er vorðin nógv betur til at skriva ummælir og at geva frágreiðingar nú enn í 2007.  Eisini staðfestir kærustovnurin, at miðal ummælistíðin hjá Umhvørvisstovuni var 1 mánaður og 18 dagar.

Av bygningsrættaðum broytingum á stovninum hava serliga móttøkan og laboratoriuøkið verið gjørd í stand. Umbyggingin hevur yvirhøvur drigið út, og enn eru fleiri manglar.  Nýggja heimasíðan kom at virka fyrst í árinum, og hevur hon verið væl móttikin.

Starvsfólk hava verið á ymiskum førleikamennandi skeiðum, m.a. einum sera væleydnaðum fyrisitingarskeiði. Eisini hava tvey starvsfólk tikið týðandi master-útbúgvingar og onnur hava verið á skeiðum innan m.a. persónsupplýsingarlóg, telduførleika og meira fakligum arbeiðstengdum skeiðum.

Við ársbyrjan var stovnurin formelt skipaður í 6 deildarøki við nýggjum heitum:

- Skrivstovusamskipan, herundir er tinglýsing og fólkayvirlit
- Vernd
- Lendi
- Kort & Skráir
- Gransking
- Viðarvøkstur og frílendi

Samlaða starvsfólkatalið var við ársenda 45 fólk. Av hesum vóru 22 kvinnur og 23 menn. Ársfrásøgnin er skipað soleiðis, at virksemið á ymisku deildunum er lýst. Í fylgiskjali 1 er nærri lýsing av visión, arbeiðsøki og endamáli.

## Fremstu avrik í 2008

- Nýgerð av móttøku- og starvsstovuhøli
- Flyting til nýggja digitala tinglýsingarskipan
- Uppskot til broytingar í matrikullóggávu gjørt
- Uppmáting av fixpunktsnetinum í samstarvið við norðanlond
- Uppseting av permanentari GPS referencustøð á Umhvørvisstovuni
- Uppseting og røkt av nýggjari heimasíðu
- Allur stovnurin komin á eitt og sama datanet – Landsnet
- Átak fyri sjónliggering av óruddi
- Leiðslu og framløga av frágreiðing um veðurlagsátøk
- Faldari um børn og kemisk evni
- Fyrisitingarmál, sum stovnurin hevur fingið staðfest av kærumyndugleika
- Plantingin í Trongisvági hevur gingið sera væl og fingið góða umrøðu
- Samstarvið við Tórshavnar kommunu um skógfriðaðu lendini
- Útbúgvingar, skeið og vitanarútbreiðslan í fjølmiðlunum

## Størstu manglar í árinum

- Sakartalið framhaldandi ov stórt
- Bil og persónsbók manglar framvegis
- Spell at NGS samstarvið ikki eydnaðist
- Fotoflúgvingin í 2008 bleiv av ongum
- Náttúruverndarlógin er ikki liðug
- Journaliseringsskipanin sera mangulfull
- Okkara tilbúgvingararbeiði ikki avsluttað
- Manglandi kemikaliiregulering
- Telefon viðurskiftini ov ógreið og tung
- Passing av bygningi og útgerð ikki nøktandi
- Frílendisætlanir bæði í Klaksvík, Mikladali og á Sevmýru eru ikki komnar fram aftur

# Skrivstovusamskipan
# (Stovnsrakstur, Tinglýsing og Landsfólkayvirlit)

Virkisøkini á Umhvørvisstovuni hava felags umsiting, sum skal tryggja, at leiðbeining og skráseting er á høgum góðskustigi, soleiðis at stovnurin livir upp til løgtingslóg um fyrisiting. Skrivstovusamskipanin umfatar stjórnarmál, tinglýsing, fólkayvirlit og felagsumsiting annars. Innan tinglýsing verða framdar almennar staðfestingar av galdandi rættarviðurskiftum og innan fólkaeftirlit verður øll persónsrelaterað staðfesting framd.

Avgreiðslan hevur hesar uppgávur og ábyrgdarøki:

- Telefon- og kundamóttøka
- Leiðbeina viðskiftafólk
- Postmóttøka og skjalaskráseting
- Skipa og avgreiða fyrispurningar
- Rættlesa og senda út post
- Bókhald og fíggjarstýring
- Tinglýsing og ognarskráseting
- Fólkaskráseting
- Umsita fíggjarmál, starvsfólkamál og lógarmál
- Skipa fyri, fyrireika og stuðla tiltøkum, fundum og felagsvirksemi
- Standa fyri goymslu og arkivum
- Skipa persónliga menning hjá starvsfólkum
- Innkeyp, vask, viðlíkahald og rakstur av bygningum

Við ársbyrjan var leiðsluráðgevi settur við tí uppgávu, at ráðgeva stjóra og deildarleiðarum í strategiskum og ítøkiligum málum. Virksemið umfatar fyrisitingarliga góðskutrygging av avgerðum stovnsins, eins og ábyrgd av støðugu menningini av fyrisitingarligu mannagongdunum á stovninum.

**Tinglýsing**

Tinglýsing hevur verið fyrisitið av danska Domstolsstyrelsen fram til 2006. Tann 1. februar 2006 kom tinglýsing undir Innlendismálaráðið, fyri síðani 1. juni 2007 at gerast ein partur av Umhvørvisstovuni. Virksemið hevur sum endamál at føra øll skjøl viðvíkjandi ognum inn í dagbók og tingbók eftir føstum reglum, serliga samsvarandi ll. um tinglýsing frá 16. august 1962.

Í árinum er nógv gjørt við at byggja nýggja dataskrá fyri tinglýsingarvirksemið. Hetta hevur verið gjørt av felagnum Atlantstøkni, og hevur umfatað at fáa flutt skrásetingar, sum vóru í donsku tinglýsingarskránni, yvir í eina nýggja føroyska skrá, sum er óheft av tí donsku skipanini. Samstundis verður øll nýggj tinglýsing framd í nýggju skipanini.

Tinglýsingarstovan flutti út á Argir í mai 2008, og var tá nýggja digitala skipanin tikin fult í nýtslu. Skiftið gekk væl, og er gjørd ein stuðulsavtala uppá nýggju tinglýsingarskipanina við Atlantstøkni. Bil- og persónsbók er ein partur av tinglýsingarvirkseminum, sum framhaldandi verður gjørt eftir gomlum og ótíðarhóskandi leisti. Her er ætlanin at arbeiða við nýskipan í 2009. Eisini er

ætlanin at fara undir meira skipaða skanning av málum, soleiðis at ikki gerst neyðugt at gamlar málsmappur eru tøkar í avgreiðsluni.

Eitt tinglýsingarmál varð viðgjørt av Føroya Kærustovni í árinum. Hetta snúði seg um eina avvísing av einum hjúnasáttmála, tí mett varð, at hann var fyrnaður. Avgerðin varð broytt, tí nevndin metti, at hjúnasáttmálar ikki eru fevndir av fyrndarreglunum.

Nógv ymisk skjøl verða móttikin og førd í dagbók innan tinglýsingarvirksemið. Fylgjandi hagtøl vísa, hvat er tinglýst í árinum.

Tal á skjølum innkomin til tinglýsing:

| | 2008 | 2007 | 2006 | 2005 | 2004 | 2003 | 2002 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fastari ogn** | **18.361** | **13.874** | **16.358** | **15.711** | **15.695** | **16.038** | **18.138** |
| **Leysafæ** | **3.646** | **5.317** | **5.271** | **5.165** | **4.780** | **5.034** | **5.203** |
| **Ognarheimildarskjøl** | **5.247** | **2.621** | **2.897** | **2.605** | **2.324** | **22** | |
| **Lániskjøl** | **5.317** | **3.449** | **3.741** | **2.958** | **2.770** | **2.959** | |
| **Onnur skjøl** | **7.797** | **7.551** | **9.399** | **8.553** | **8.694** | **9.223** | |
| **Ùtskriftir viðv. fastari ogn** | ***** | **253** | **323** | **1.595** | **1.507** | **1.562** | |

* Ùtskriftir viðv. fastari ogn 2008 er ein partur av øðrum skjølum.

Inngjaldið av tinglýsingargjøldum var í 2008 broytt, soleiðis at inngjaldið fór frá at hava verið tengt at játtanini til tinglýsing til at fara beinleiðis í landskassan. Løgtingslógirnar um tinglýsingargjøld (løgtingslóg nr. 76 frá 17. mai 1994 um tinglýsingargjøld v.m.) og tinglýsingaravgjøld (løgtingslóg nr. 8 frá 28. februar 2006 um tinglýsingaravgjald) vórðu broyttar 2. og 10. juni 2008, soleiðis at tinglýsingargjaldið hækkaði úr kr. 100 upp í kr. 1000 og at veðbrøv o.t. skuldu rinda eitt hálvt prosent av veðtryggjaðaðu upphæddini í tinglýsingaravgjaldi. Hetta merkti, at veðbrøv nú eru javnsett við ognarheimildarskjøl (t.d. skeyti) í sambandi við útrokningina av tinglýsingaravgjaldinum. Inngjaldið var í 2008 uml. 18.874.000,-. Hetta er nakað minni, enn roknað varð við, tá tinglýsingargjaldið varð hækkað.

**Fólkayvirlit**

Landsfólkayvirlitið flutti í juni mánað 2007 úr Innlendismáláráðnum inn á Umhvørvisstovuna úti á Argjum. Virksemið á fólkayvirlitinum hevur verið sera arbeiðskrevjandi og undirmannað við einum starvsfólki. Arbeiðshjálp er í stóran mun fingin frá øðrum skrivstovufólkum, og hevur hetta virkað nakað inn á arbeiðsgongdina í avgreiðsluni á matrikuløkinum. Arbeiðið við at umleggja Landsfólkayvirlitið, soleiðis at fyrisitingin verður skipað eftir nýggju lógini, er í gongd. Ein verkætlanarleiðari var í novembur 2008 settur til at standa fyri eini nýggjari digitalari skipan fyri landsfólkayvirlitið.

Útyvir tær flytingar og skrásetingar, ið síggjast á manntalslistanum fyri 2008, hevur Landsfólkayvirlitið eisini skrásett vígslur, dóp/navnagávu, navnabroytingar, fólkakirkjustøðu, sundurlesingar, fráskilnaðir, ættleiðingar og foreldramyndugleika. Eisini hevur Landsfólkayvirlitið svarað umleið 1600 fyrispurningum um bústað, umleið 370 fyrispurningum frá Føroya Skiftirætti í sambandi við fráboðan um andlát, umleið 50 fyrispurningum frá

**Manntal 2008**

| Kommunur | Manntal 01/01-08 | Flutt í Komm. | Flutt úr Komm. | Fødd | Deyð | Manntal 31/12-08 | Flutt til Føroya | Flutt úr Føroyum |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **FUGLOYAR** | 42 | 3 | 4 | 1 | 2 | 40 | 1 | 0 |
| **SVÍNOYAR** | 48 | 0 | 7 | 0 | 1 | 40 | 0 | 0 |
| **VIÐAREIÐIS** | 352 | 17 | 23 | 7 | 2 | 351 | 8 | 10 |
| **HVANNASUNDS** | 435 | 16 | 14 | 8 | 5 | 440 | 6 | 3 |
| **KLAKSVÍKAR** | 4.881 | 199 | 212 | 64 | 41 | 4.891 | 119 | 134 |
| **KUNOYAR** | 160 | 7 | 9 | 1 | 0 | 159 | 0 | 3 |
| **HÚSA** | 60 | 0 | 3 | 1 | 0 | 58 | 0 | 3 |
| **FUGLAFJARÐAR** | 1.541 | 114 | 101 | 15 | 14 | 1.555 | 74 | 61 |
| **LEIRVÍKAR** | 888 | 24 | 42 | 14 | 6 | 878 | 7 | 17 |
| **GØTU** | 1.071 | 62 | 57 | 13 | 8 | 1.081 | 36 | 28 |
| **NES** | 1.247 | 74 | 68 | 11 | 6 | 1.258 | 33 | 29 |
| **RUNAVÍKAR** | 3.681 | 213 | 202 | 46 | 29 | 3.709 | 106 | 90 |
| **SJÓAR** | 1.014 | 51 | 53 | 12 | 11 | 1.013 | 26 | 26 |
| **EIÐIS** | 696 | 44 | 43 | 6 | 8 | 695 | 21 | 24 |
| **SUNDA** | 1.586 | 125 | 82 | 30 | 9 | 1.650 | 28 | 36 |
| **FUNNINGS** | 75 | 7 | 7 | 1 | 1 | 75 | 4 | 2 |
| **KVÍVÍKAR** | 604 | 48 | 53 | 7 | 2 | 604 | 19 | 21 |
| **VESTMANNA** | 1.227 | 65 | 46 | 20 | 14 | 1.252 | 45 | 26 |
| **SANDAVÁGS** | 805 | 63 | 49 | 19 | 5 | 833 | 22 | 24 |
| **MIÐVÁGS** | 1.106 | 73 | 71 | 14 | 6 | 1.116 | 36 | 45 |
| **SØRVÁGS** | 1.097 | 73 | 49 | 20 | 8 | 1.133 | 35 | 18 |
| **SANDS** | 578 | 37 | 31 | 8 | 8 | 584 | 6 | 10 |
| **SKOPUNAR** | 506 | 31 | 30 | 6 | 8 | 505 | 12 | 13 |
| **SKÁLAVÍKAR** | 176 | 10 | 14 | 0 | 3 | 169 | 5 | 6 |
| **HÚSAVÍKAR** | 129 | 4 | 7 | 0 | 1 | 125 | 1 | 4 |
| **SKÚVOYAR** | 60 | 1 | 7 | 1 | 0 | 55 | 1 | 0 |
| **HVALBIAR** | 758 | 22 | 45 | 7 | 9 | 733 | 3 | 8 |
| **TVØROYRAR** | 1.791 | 108 | 121 | 12 | 18 | 1.772 | 62 | 36 |
| **FÁMJINS** | 109 | 1 | 2 | 3 | 1 | 110 | 1 | 1 |
| **HOVS** | 119 | 4 | 5 | 1 | 4 | 115 | 0 | 1 |
| **PORKERIS** | 338 | 9 | 14 | 3 | 1 | 335 | 1 | 5 |
| **VÁGS** | 1.417 | 61 | 78 | 15 | 10 | 1.405 | 29 | 34 |
| **SUMBIAR** | 379 | 22 | 18 | 2 | 6 | 379 | 14 | 7 |
| **TÓRSHAVNAR** | 19.399 | 1.177 | 1.102 | 288 | 126 | 19.636 | 786 | 726 |
| **Tilsamans** | **48.375** | **2.765** | **2.669** | **656** | **373** | **48.754** | **1.547** | **1.451** |

Almannastovuni í sambandi við pensjónir. Skrivaðar eru umleið 90 bústaðarváttanir til Útlendingastovuna, umleið 80 váttanir til lesandi í DK fyri frítøku av herskyldu, umleið 20 váttanir til lesandi til brúk til umsókn um SU, umframt aðrar váttanir av ymsum slagi, t.d. váttan um ógiftan persón (skrásettur ógiftur í LFY) og váttan um ríkisrætt (skrásettur í LFY) m.v.

Løgtingsval var 19. januar, og kommunuval var 11. novembur 2008, og gekk hetta væl, serliga við tí hjálp, sum starvsfólk, bæði í IMR og á Umhvørvisstovuni, veittu í sambandi við fyrireiking og at senda valkort út til kommunur.

Eitt sindur av iva hevur verið um, hvørt tað loysir seg at senda rokningar út fyri stakar fyrispurningar, við tað at Føroya Gjaldstova hevur viðmerkt, at upphæddin er so lítil, at tað er ivasamt, um tað nú loysir seg, eins og teir settu spurnartekin við, um tað nú er heimild í lógini, sum kom í gildi 01.10.2007. Grundað á siðvenju hava vit tó hildið fram at krevja inn, so rokningar uppá kr. 31.125,- eru sendar út fyri alt 2008.

Fundur var tann 21. novembur við danska Folkeregisteret. Her var endamálið at fáa innlit í, hvussu tað danska CPR verður rikið, í sambandi við, at lógarverkið í Føroyum er broytt í 2007, og lógin í stóran mun er einsljóðandi tí donsku. Royndir og mannagongdir í CPR kunnu tí í stóran mun brúkast í Føroyum. Tosað var um ymisk mál út frá spurningum, sum vit høvdu sent frammanundan. Vit fingu ymist tilfar, og fingu at vita, at vit kunnu seta okkum í samband við CPR-skrivstovuna, um vit hava brúk fyri hjálp og leiðbeining. Upplýst varð, at CPR-skrivstovan skipar fyri skeiðum í fólkaskráseting, har kommunurnar luttaka.

**Felagsskrivstovan**

Stovnurin avgjørdi í vár at seta skrivstovunæming, og var hesin settur frá august 2008. Tað hevur gingið sera væl, og er áhugi í at menna ein lærlingapolitikk á stovninum. Roknað verður soleiðis við, at stovnurin kemur at seta ein lærling regluliga, soleiðis at hetta gerst ein skipaður partur á Umhvørvisstovuni.

Journalskipanin hevur í 2008 í stóran mun bygt á gomlu skipanirnar, men hava nýggj skjøl yvirhøvur verið skrásett í Doculive-web skipan, sum var tikin í nýtslu fyrst í árinum. Henda journalskipan vísti seg sera trupul at fáa innarbeitt og tillagað til tann tørv, sum ymisku deildirnar hava. Í endanum av árinum hevur tískil verið arbeitt við at tikið støðu til, hvat mátti gerast, fyri at fáa eina vælvirkandi journalskipan, sum allur stovnurin kundi byggja sítt virksemi á. Avgjørt var at fara frá Doculive-web skipanini til nýggjari skipan ”360”, sum so skuldi innarbeiðast yvir alt økið samstundis. Væntandi er hetta liðugt á vári 2009.

Nógv umbygging er farin fram í árinum, og hevur hetta millum annað havt týdning fyri móttøkuna. Hølið, har móttøkan er, varð tikið í nýtslu í mai 2008, tá tinglýsingin flutti undan Glaðsheyggi og út á Argir. Arbeitt verður við at fáa móttøkuna at gerast meira viðkomandi fyri øll tey viðskiftafólk, sum koma inn á stovnin.

*Nýggj journalskipan*
Tá stovnurin varð skipaður í 2007 varð avgjørt, at US skuldi nýta Doculive web, sum bleiv knýtt uppá DL-skipanina hjá IMR. Orsakað av, at avgerðin um eitt felags EDV-net fyri US dró út (netið kom 1. oktober 2008), bleiv DL einans innførd á Vernd.

Í oktober 2008 bleiv arbeiðið við felags journalskipanini fyri stovnin tikið uppaftur, men skjótt gjørdist greitt, at DL-web ikki var ein nøktandi skipan. Eftir at málið var umhugsað eina tíð, bleiv avgjørt at sleppa DL-web, og í staðin keypa nýggju 360-sharepoint skipanina frá Formula Føroyar. Sáttmálin varð gjørdur fyri jól 2008, og nýggja skipanin skal takast í nýtslu á øllum stovninum, áðrenn summarferiuna 2009.

**Fígging**
Felags roknskaparreglugerð fyri samanløgdu stovnarnar var gjørd fyrst í árinum. Henda skal gjøgnumgangast av nýggjum, nú Náttúrugripasavnið er farið úr stovninum.

Í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2008 var biðið um 11 mill. fyri at kunna økja virksemið innan tey mest átrokandi málsøkini. Í fíggjarlógarjáttanini kom ein økt upphædd uppá góðar 2 milliónir til serliga altjóða og veðurlagsrelaterað virksemi. Fíggjarjáttanin fyri árið kom tó ikki fyrr enn fram móti sumri 2008.

Í uppskotinum til fíggjarlóg 2009 var biðið um fígging til nýggj økir, serliga kemikaliuøkið, planskráseting, frílendir o.t. Tað vísti seg tó, at fíggjarnevndararbeiðið í Løgtinginum endaði við eini samlaðari skerjing uppá tilsamans 5.623.000,-. Hetta stóðst av, at Náttúrugripasavnið varð tikið úr aftur stovninum, at stovnurin skuldi økja sínar inntøkur og at mett var, at stovnurin hevði kr. 870.000,- í ov høgari játtan.

Fíggjarjáttanin 2008 og umbønin til fíggjarlóg 2009 sæst í fylgjandi talvu:

**Fíggjarlógarumbøn** (X 1000)

| Útreiðslur | 2008 | Æ2008 |
|---|---|---|
| Fólkayvirlit | 2.002 | 2.002 |
| Tinglýsing | 4.070 | 4.070 |
| Vernd | 3.488 | 3.488 |
| Lendi | 5.007 | 5.007 |
| Náttúrusavn/fyrisiting | 3.173 | 3.173 |
| Viðarøkt/frílendi | 2.812 | 2.812 |
| Klima, altjóða avtalur, O&M o.l. | 2.211 | 2.211 |
| Nýtt virksemi: Kemikaliur, Býar &Planskipan, Náttúra.. | | 10.000 |
| Íalt | 21.872 | (31.872) |
| + Inntøkur | 2.600 | 4.800 |

Tá stovnurin varð skipaður var bygt á fleiri fíggjarlig stovnsnummur. Virksemið er nú savnað í einum stovnsnummari fyri øllum vanligum stovnsvirksemi 151100 og einum stovnsnummari fyri tað inntøkufíggjaða virksemið 149900. Harafturat hevur Umhvørvisstovan í 2008 havt ábyrgd av stovnsnummari 132005, viðvíkjandi hvalagransking, hvalateljing o.a.

| Stovnsnummar | Heiti | Salda 14-2008 | Játtan 2008 |
|---|---|---|---|
| 112120 | Skógrøkt Landsins K | 0 | 0 |
| 114020 | Matrikulstovan K | 0 | 0 |
| 132005 | Hvalagransking, hvalateljing o.a. K | 975.225 | 950.000 |
| 146065 | Skógrøkt Landsins, inntøkufíggjað virksemi K | 0 | 0 |
| 146865 | Tinglýsingin K | 0 | 0 |
| 149270 | Tinglýsingargjald K | -18.936.679 | -27.300.000 |
| 149900 | Umhvørvisstovan, Inntøkufíggjað virksemi K | -5.682 | 0 |
| 151100 | Umhvørvisstovan K | 24.435.559 | 24.372.000 |
| | Løguútreiðslur | 2.364.397 | 2.500.000 |

Nú árið 2008 er farið afturum ber til at gera fylgjandi figgjarligu lýsing av árinum:

| Deildir | Útreiðslur | Inntøkur | Nettonýtsla |
|---|---|---|---|
| Felagsskrivstova, tinglýsing, fólkayvirlit o.t. | 11.600.166 | 226.511 | 11.373.655 |
| Lendi | 5.448.423 | 3.079.478 | 2.368.945 |
| Fríøki | 2.410.617 | 11.510 | 2.399.107 |
| Vernd | 2.787.187 | 106.800 | 2.680.387 |
| Kort & Skráir | 1.914.097 | 378.682 | 1.535.415 |
| Gransking | 1.195.843 | 20.895 | 1.174.948 |
| Náttúrusavn | 3.058.904 | 205.772 | 2.853.132 |
| Umhvørvisstovan samlað: | **28.415.237** | **4.029.648** | **24.385.589** |

Talvurnar vísa at samlaða útreiðslan hjá stovninum í 2008 var 28,4 milliónir, tá eisini Náttúrugripasavnið var við. Samstundis hevði stovnurin inntøkur uppá góðar 4 milliónir og var nettojáttanin á fíggjarlógini sostatt góðar 24,3 milliónir. Samstundis móttók stovnurin góðar 18,9 milliónir í tinglýsingarinntøkum. Hetta merkir at netto hevur stovnurin í 2008 kosta fíggjarlógini umleið 5,4 milliónir.

Afturat hesum virksemið hevur Umhvørvisstovan ymiskar verkætlanir, plantusølu o.a. beinleiðis inntøkufíggjað virksemið. Í 2008 hevur verið arbeitt við fylgjandi verkætlanum, sum hava uttanhýsis fígging:

| | Brúkt í 2008 | Verkætlanarpeningur pr. 31.12.2008 |
|---|---|---|
| Dancea | 2.430 | 19.826 |
| Kópamerking | 12.028 | 32.273 |
| Small Cetacean Survey | 169.342 | 105.109 |
| SEV | 1.037.217 | 288.637 |
| AMAP | 483.236 | 530.396 |
| MEEL | 4.302 | 5.670 |
| Taðing av fiskaslógvi | 223.445 | |
| Klaksvík, miljøstandsanalyse | 11.600 | |
| Nye POP'er i marine pattedyr | 196.570 | 66 |
| Envofar | 261.368 | |
| **Íalt brúkt til verkætlanir í 2008** | **2.401.538** | **981.977** |

Umframt tær omanfyri lýstu verkætlanir hevur stovnurin gjørt kanningar fyri Eiðis og Tórshavnar kommunu.

**Altjóða samstarv, ráðstevnur og fundir**

Stovnurin er virkin í norðurlendskum samstarvi, og hava umboð fyri stovnin luttikið á ráðstevnum og fundum í tilknýti til hetta virksemið. Afturat hesum samstarvi hevur stovnurin havt samstarvsfundir við danska Miljøstyrelsen og danska Kort- og Matrikelstyrelsen. Eisini hevur stovnurin luttikið í altjóða IMO fundum og í granskingarsamstarvi.

Fleiri ráðstevnur hava verið í árinum, har Umhvørvisstovan hevur luttikið, m.a. var Al Gore í Føroyum í vár, og gjørdist hetta týdningarmikið fyri at fáa útlát av veðurlagsgassum meira fram á politiska skránna. Umhvørvisstovan hevur havt vitjan av løgtings- og landsstýrisfólki, tá stovnurin undan summarferiuni kunnaði um føroyska útlátið av veðurlagsgassum. Eisini hevði stovnurin vitjan av landsstýrisfólki og aðalráðum, tá kunnað var um innihaldið í frágreiðingini um veðurlagstiltøk seint í heyst.





Umhvørvisstovan luttók á Jobmatch í septembur, sum partur av Granskingarráðnum. Vit mettu tað av stórum týdningi at røkja granskingar- og menningarvirksemi á stovninum.

**Starvsfólk**
Samlaða starvsfólkatalið í desembur 2008 var 45 fólk. Herav eru 22 kvinnur og 23 menn.
Sáttmálabýtið sær soleiðis út:




Hesi eru byrjaði á stovninum í 2008:
Ronnie Thomassen, byrjaði sum fyrisitingarligur ráðgevi tann 1. januar
Petur Nielsen, landmátari, byrjaði í tíðaravmarkaðum starvi á Lendi 1. januar. Petur varð tann 1. august settur sum deildarleiðari á Lendi. Hann hevur starvast á Matrikulstovuni í nøkur tíðarskeið frá 1974 til 1990.
Henrik Johansson byrjaði á Lendi 18. februar
Gunnleivur Dalsgarð byrjaði á Lendi 1. juni. Gunnleivur hevði havt farloyvi frá Matrikulstovuni síðani 1. mars 2000. Hann var settur í starv á Matrikulstovuni í 1959.
Elisabett Vørmadal byrjaði á Lendi 15. september.
Mortan Mørk byrjaði hjá Viðarvøkstri og frílendi 1. mars.
Lena Ziskason byrjaði á Vernd 15. august
Una Matras byrjaði á Vernd, 1. september
Heidi Hansen byrjaði í tíðaravmarkaðum starvi á Vernd 17. november
Makonny Dickson fór í farloyvi í august 2007 og byrjaði aftur 14. apríl.
Sofía Danielsen byrjaði sum reingeringsfólk í hálvari tíð 16. juni
Erlina Johannesen byrjaði á tinglýsingini 30. juni, 16 tímar um vikuna
Harriet Davidsen byrjaði sum næmingur 16. september
Kurt Madsen byrjaði í tíðaravmarkaðum starvi á Kort&Skráir 1. november.

Hesi starvsfólk hava í styttri tíðarskeið arbeitt á stovninum:
Hallbera Fríða West byrjaði tann 1. mai, men helt uppat aftur eftir eina viku.
Sjúrður Hammer hevur starvast í tíðaravmarkaðum starvi á deildunum Vernd og Gransking frá mai til august.
Morten Christensen hevur starvast nakrar mánaðir av árinum hjá Viðarvøkstri og frílendi.
Eli Elttør byrjaði í tíðaravmarkaðum starvi 24. november og árið út.

Hesi starvsfólk eru í farloyvi og barsil:
Connie Jacobsen, fór í farloyvi 1. juni
Julianna Húsgarð, fór í farloyvi 1. september
Rakul Lindberg, fór í barsil 13. mai
Hildur Nielsen, fór í barsil 18. august

Starvsfólk farin úr starvi í 2008:
Ásla Andreassen, reingerðarfólk, fór úr starvi, 31. mars
Beinta Ziska Nielsen, matrikulteknikari, fór úr starvi 30. apríl
Hallbera Fríða West, samfelagsfrøðingur, fór úr starvi 11. mei
Arnold Thomassen, landmátari, fór úr starvi, 25. juli
Theresa Krogager, skrivstovuavloysari, fór úr starvi 31. juli
Herdis Jacobsen, reingerðarfólk, fór úr starvi 31. oktober

Av øðrum starvsfólkahendingum kann serliga nevnast, at Maria Dam, deildarleiðari á Gransking&Menning, fekk herðarklapp frá Eik Banka fyri sína gransking. Mona Wang og Antines Iversen høvdu 45 ára starvsdag.

Tvey uppsagnarmál hava verið í árinum.

Ein neyv greining vísur at 40,845 ársverk, altso knapt 41 ársverk, vóru virkin í februar 2009. Um 50 starvsfólk eru tengd at stovninum so ella so, harav 14 starvast niðursetta tíð.

*Leiðslubygnaðurin*

Nýggir deildarleiðarar eru settir í árinum, og er leiðslubólkur skipaður.

Petur Nielsen, landmátari, fekk leiðandi ábyrgd av øllum lendisfyrisitingarliga virkseminum á stovninum tann 1. august, tá Bjarni Hansen bað um at verða loystur úr starvi sum leiðari, nú hann var 67 ár. Petur hevur drúgvar royndir innan hesi virkisøki. Hann hevur frammanundan verið við til at bygt upp Føroya DátuSavn.

Maria Dam, evnafrøðingur, Dr. Scient, fekk leiðandi ábyrgd av virkseminum innan gransking og umhvørviseftiransing. Maria hevur drúgvar royndir innan umhvørvisevnafrøði.

Súsan V. Danielsen, skrivstovuleiðari, fekk leiðandi ábyrgd av samskipaða skrivstovu-virkseminum á stovninum. Súsan hevur drúgvar royndir frá skrivstovuarbeiði m.a. innan tinglýsing.

Jóhanna Olsen, lívfrøðingur, fekk leiðandi ábyrgd av umhvørvisverndarfyrisitingini á stovninum og at fáa ment eina framtíðar náttúrufyrisiting.



Leiðsluseminar á Viðareiði í desembur 2008

*Førleikamenning*
Í 2008 varð denturin lagdur á fyrisitingarliga menning av øllum starvsfólkum, og ávísar týðandi skeiðstilgongdir hjá nøkrum av teim nýggju deildarleiðarunum. Eisini vóru tvey av starvsfólkunum á Vernd á "miljømedarbejder-skeiði".

Tann 30.-31. oktober 2008 var allur stovnurin á skeiði í fyrisitingarlógini. Skeiðið varð hildið av Jonhard Klettheyggj og Petur Elias Nielsen, sum báðir hava drúgvar royndir sum undirvísarar í evninum. Skeiðið var væleydnað, og avgjørt varð eftirfylgjandi at fylgja tí upp við einum skeiði í almennum innliti. Hetta var sett til at vera tann 6. februar 2009 við Jonhard Klettheyggj sum undirvísara.

Í framhaldandi førleikamenningini fyri stovnin í 2009 verður høvuðsdenturin helst lagdur á reiðskapsfak (access, excel, word, outlook, microstation etc.)

Jóhanna Olsen, deildarleiðari á Vernd, fekk í vár prógv sum master í tøkniligari-vísindaligari umhvørvismeting frá Aalborg Universitet, og Suni Petersen fekk prógv sum master í orku- og umhvørvisrætti frá Århus Universitet. Báðar útbúgvingarnar eru tiknar sum fjarlestur og luttøku á regluligum skeiðum.

Svanna, Sunrid og Suni hava verið á skeið í Doculive, og Sunrid, Svanna og Súsan hava verið á skeið í persónsupplýsingarlógini. Beinta og Súsan hava fylgt grundskeiði í lóg, sum Fróðskaparsetrið skipar fyri.

Ronnie hevur verið á hesum skeiðum í 2008: "Tendenser i forvaltningsretten" og "kommunalret". "Tendenser i forvaltningsretten" var fyriskipað av DJØF, og undirvísarar vóru frá danska umboðsmanninum. Skeiðið hevði til endamáls at lýsa nýggjastu gongdina innan fyrisitingarrætt og vísa á, hvønn týdning henda hevur. Partar av innihaldinum av skeiðnum kundu beinleiðis nýtast í arbeiðinum á US, t.d. til eina støðutakan av, hvør ið hevur kærurætt í lendiskærumálum. Harumframt hevði skeiðið eisini starvsfólkarættarligan relevans, tí hægstirættur hevur nevniliga broytt praksis í sambandi við mál um uppsagnir av starvsfólkum.

Skeiðið í kommunalrætti hevði til endamáls at lýsa rættargrundarlagið hjá kommunum og kommunalpolitikarum, og hvar mørkini ganga fyri heimildunum hjá kommununum. Relevansurin fyri US var, at hetta gevur ein væl betri førleika fyri at meta um kommunalar avgerðir og tilráðingar á teim økjum, har US og kommunur eru partur av somu málstilgongd.

**Lóggávuarbeiði**
Í 2008 eru tvinni lógaruppskot og eitt uppskot til kunngerð gjørd. Lógaruppskotini vórðu bæði latin IMR tann 27. november 2008, meðan uppskotið til kunngerðina varð sent IMR 9. desember 2008.

*Broytingar í matrikullógini*
Uppskotið til broytingar av matrikullógini er fyrst og fremst ein tiltrongd uppdatering av tí knapt 50 ára gomlu lóggávuni. Uppskotið inniheldur tó eisini ávísar liberaliseringar, so møguligt verður at býta landbúnaðarjørð sundur undir ávísum treytum. Harumframt inniheldur uppskotið nakrar tekniskar tillagingar og neyðugar dagføringar. Hesar snúgva seg um

konsekvensbroytingar í mun til lóg um landsjørð (frámatrikulering av bygningum á festum), matrikulering av útfyllingum og eigindómum undir jørð og betri amboð til at gera rættingar í matriklinum viðvíkjandi vegum, ið eri eldri enn 20 ár. Fyrsta útkastið varð liðugt í summar, men tá nýtt landsstýri kom til, vóru ynski um ávísar liberaliseringar, og nýggja uppskotið varð liðugt ultimo november 2008.

Lógaruppskotið bleiv til í tøttum sambandi við Lendi, sum gjøgnumgekk tekstin í fleiri umførum, og kom við eini ørgrynnu av konstruktivum uppskotum og rættingum. Teimum at takka, bleiv uppskotið eitt dygdargott handverk.

*Broytingar í býarskipanarlógini*

Hetta lógaruppskotið bleiv gjørt sum ein konsekvensbroyting orsakað av liberaliseringunum av matrikullógini. Fortreytin fyri at kunna sundurbýta landbúnaðarjørð verður nevniliga, at tað ávísa økið í galdandi byggisamtykt skal vera lagt út sum landbúnaðarøki. Tí inniheldur lógaruppskotið til broyting í býarskipanarlógini eitt plankrav ið ásetur, at allar kommunur skulu hava eina byggisamtykt fyri allar bygdir í kommununi. Freistin fyri at hava sent landsstýrismanninum uppskot um byggisamtykt, verður í lógaruppskotinum ásett til 31. desember 2010.

Hin høvuðsbroytingin í býarskipanarlógini verður, at ein sonevnd landsplanskrá verður gjørd. Lógaruppskotið heimilar landsstýrismanninum at áseta nærri reglur fyri landsplanskránni í kunngerð.

*Nýggj kunngerð um matrikulgjøld*

Gamla kunngerðin um matrikulgjøldini er frá 1993, og gjøldini eru ikki dagførd síðani. Ein dagføring av teimum bleiv tengd at fíggjarlógararbeiðinum 2009, og tí bleiv eitt uppskot til nýggja kunngerð gjørt. Arbeiðið bygdi partvís á eina frágreiðing, sum løgfrøðilesandi, lat úr hondum í mai 2008, og partvís á uppskot frá Lendi. Meginreglan í dagføringini av gjøldunum var, at hesi vórðu hækkað til tað dupulta.

*Dagføring av tinglýsingarkunngerðini*

Hetta arbeiðið bleiv sett í verk orsakað av, at Lendi hevur tørv á eini meira smidligari skipan í sambandi við sonevndu óskalisváttanir. Avgjørt bleiv síðan at gera eina dagføring av teimum pørtum í tinglýsingarkunngerðini, sum vóru lættir at hava við at gera. Kunngerðin bleiv gjøgnumgingin saman við Monu og Rannvá, og eitt uppskot til dagføring síðan gjørt.

Undir gjøgnumgongdini varð komið fram til, at ein dagføring av kunngerðini (um hvussu tingbókin verður førd) var ov umfatandi. Hetta tí nýggja tinglýsingarskipanin broytir viðurskiftini so mikið nógv, at allur hesin parturin av kunngerðini má gerast av nýggjum, og tað arbeiðið er ov rúgvumikið í verandi støðu.

Tinglýsingarkunngerðin bleiv jólatrøll, tí hon varð ikki mett at hava bráðskund. Fyrst í januar 2009 kom eitt ynski frá IMR um, at konsekvensbroytingar í mun til nýggju lutaíbúðarlógina skulu gerast í tinglýsingarkunngerðini. Tað arbeiðið varð liðugt hálvan januar, og kunngerðin bleiv send til IMR tann 18. januar 2009.

*Gjørt lóggávuyvirlit*
Í januar-februar 2008 var gjørdur ein dagførdur og fullfíggjaður listi yvir alla ta lóggávu, við tilhoyrandi kunngerðum, sum Umhvørvisstovan varðar av. Listin liggur á heimasíðuni hjá US, og verður regluliga dagførdur.

**Serstøk fyrisitingarlig ráðgeving**
Í januar 2008 heitti Tróndur Leivsson vegna Skógfriðingarnevndina á ráðgevan um at vera hjásitari á einum fundi við ein advokat, sum vildi hava skógfriðingarnevndina at hevja ein servitutt á einum eigindómi, sum advokaturin hevði verið við til at fáa seldan. Varð servitutturin hevjaður, hevði grundfortreytin fyri skógfriðingini verið burtur, og hetta kundi skógfriðingarnevndin sum myndugleiki ikki góðtaka.

Fundurin varð hildin, og ráðgevin leiddi hann vegna formannin í skógfriðingarnevndini. Advokaturin var sera ónøgdur við ikki at fáa undirtøku fyri sínum sjónarmiðum. Uppskot til formliga avgerð varð skrivað, sum skógfriðingarnevndin síðan sendi advokatinum. Í skrivinum var hann vegleiddur um, at avgerðin ikki kundi kærast, men hann kærdi kortini avgerðina og málsviðgerðina til IMR. Úrskurðurin gav skógfriðingarnevndini viðhald í, at avgerðin ikki kundi kærast, og IMR vísti málinum frá sær. Síðan hevur onki verið at frætt í málinum, sum tí má metast at vera endað.

*Frílendisætlanin á Sanatoriutrøðni*
Skógrøkt landsins hevur í longri tíð arbeitt við eini frílendisætlan á Sanatoriutrøðni. Tá Skógrøktin gjørdist partur av US, fylgdi ætlanin við, og skjøtil varð settur á hana í 2008. Ein stýrisbólkur varð mannaður við umboðum frá US (Ronnie Thomassen, Petur Nielsen og Tróndur Leivsson), Tórshavnar kommunu (Tóri í Hoyvík og Mikael Viderø) og Mentamálaráðnum (Andras Mortensen).

Projektbólkurin hevur gjørt eitt uppskot til tilgongdina í málinum. Næsta stigið í ætlanini er, at verandi brúkarar av lendinum skulu boðast til fundar, har teir skulu dokumentera síni rættindi til at disponera á økinum. Hesir leigusáttmálar skulu síðan uppsigast. Samstundis skal ein ítøkilig dispositiónsætlan gerast fyri økið. Hetta arbeiðið kemur væntandi at vara í fleiri ár.

*Dátueftirlitið / grundskráir v.m.*
Í 2008 blivu stig tikin til at fáa øll formlig viðurskifti í lagi yvir fyri Dátueftirlitinum, í sambandi við grundskráirnar sum US varðar av. Ein fundur varð hildin við Dátueftirlitið, har niðurstøðan var, at flestu formligu viðurskifti vóru í ordan. Matrikulskráin, tinglýsingarskráin, adressuskráin og landsfólkayvirlitið hava sostatt síni viðurskifti í ordan. Seinni viðgjørdi Dátueftirlitið spurningin um, hvørt matrikulin kann lata FDS upplýsingar í elektroniskum formi. Niðurstøðan var, at tað ikki er so heppið, at slíkir upplýsingar eftirfylgjandi verða nýttir á annan hátt av teimum, ið keypa teir frá FDS. Men Dátueftirlitið ger kortini ikki meira við spurningin, og US kann sostatt lata FDS upplýsingarnar.

Ein snøkil hekk tó eftir, og hesin var ein skipan við formligari fráboðan í sambandi við at LFY flytir upplýsingar av landinum. Loyvið at flyta upplýsingarnar er í lagi, men ein praktisk loysn skal finnast í sambandi við fráboðanirnar.

*Innanhýsis rundskriv*
Trý innanhýsis rundskriv um fyrisitingarligar mannagongdir eru gjørd; eitt um góðskutrygging av viðgerðini av kærumálum, eitt um undirskriving av avgerðum tiknar í ítøkiligum málum og eitt um rokningar.

Rundskrivini hava til endamáls at leggja eina fasta fyrisitingarliga mannagongd fyri hoyringssvarum í sambandi við kærumál, og at skapa eina náturliga góðskutrygging av avgerðum stovnsins í ítøkiligum málum. Gjørd er tann skipan, at uppskot til rundskriv verða send til leiðsluna, sum ger neyðugar rættingar. Hareftir verða rundskrivini endaliga staðfest á leiðslufundi.

**Kærumál**
Sambært rundskrivinum um kærumálsviðgerð skulu hoyringsskriv í sambandi við kærumál eftirkannast, áðrenn hesi verða send kærumyndugleikanum. Av tí at kærunevndin í lendismálum er so mikið nýggj, hevur hetta merkt, at ráðgevin hevur skrivað flestu hoyringsskrivini í sambandi við lendiskærumál í 2008. Harafturat hevur ráðgevin saman við avvarðandi deildarleiðara viðgjørt eitt kærumál um burturkast, har Umhvørvisstovan er kærumyndugleiki. Herundir er ein stutt lýsing av kærumálunum frá 2008.

*Varðagøta 79*
Málið um Varðagøtu 79 snýr seg um, at Tórshavnar kommuna hevur loyvt eini útstykking, ið ikki er í tráð við byggisamtyktina. Húsini eru bygd, og fólk flutt inn, men Lendi hevur noktað sundurbýtinum undir tilvísing til, at grundstykkini eru undir lægstamarkinum fyri grundstykkjastøddir eftir galdandi byggisamtykt.

Kærarin vil prinsipalt vera við, at Umhvørvisstovan ikki er rættur myndugleiki eftir § 17 litra c í matrikullógini, og harvið skal heimild ikki vera fyri at nokta sundurbýtinum. Subsidiert førir kærarin fram, at kommunan sbrt. § 17 í matrikuleringslógini hevur heimild at geva undantaksloyvi frá minstuvíddunum á grundstykkjum.

Ímóti hesum hevur Umhvørvisstovan blankt afturvíst, at stovnurin ikki hevur myndugleikaheimild eftir § 17 í matrikuleringslógini. Harumframt er ført fram, at undantaksloyvi kann gevast frá minstuvíddunum av grundstykkjum, men at hetta skal gerast við eini serstakari byggisamtykt. Harafturat eru ávísar kreativar arealútrokningar hjá kæraranum afturvístar.

Hoyringssvarið varð latið 1. september 2008, og endurhoyringssvar latið ultimo oktober. Kærunevndin hevur enn ikki gjørt úrskurð í málinum.

*Frábýti av vinnubygningum á festi*
Hetta kærumálið var rættiliga politiskt betent, tá tað kom fram á sumri 2008. Búnaðarstovan var greið yvir, at Umhvørvisstovan hevði eina støðutakan um, at matrikullógin ikki heimilar frábýti av vinnubygningum á festum. Somuleiðis var Búnaðarstovan greið yvir, at arbeitt varð við konsekvensbroytingum í matrikullógini, í mun til lóg um landsjørð. Stovnurin sendi kortini

4 tílík mál um sundurbýti til Umhvørvisstovuna, sum øll vórðu avvíst vegna væntandi lógarheimild. Hareftir kærdi Búnaðarstovan tað eina málið.

Málið var sera prinsipielt, og elvdi til eina málsgjøgnumgongd í matrikulumsitingini. Hugt varð serliga eftir fordømum um, hvørt sethús á festum áður vóru frábýtt, og um vinnubygningar á festum áður hava verið frábýttir. Gjøgnumgongdin vísti, at fordømi eru um, at sethús eru frábýtt, meðan fordømi ikki eru um frábýti av vinnubygningum. Niðurstøðan varð tí, at framyvir kann Umhvørvisstovan játta sundurbýti av sethúsum á festum, um hetta er í tráð við galdandi byggisamtykt – tvs. eftir vanligum treytum. Hinvegin er lógarheimild framvegis ikki fyri frábýti av vinnubygningum á festum. Hetta varð sagt í fyrsta hoyringsskrivinum til kærustovnin. Somuleiðis varð spurnartekin sett við, hvørt Búnaðarstovan yvirhøvur hevði rætt at kæra í hesum málinum.

Kærumálið kom síðan til endurhoyringar (november 2008), har kærarin kom við eini rúgvu av dømum við páhaldi um, at hesi vóru fordømi um frábýti av vinnubygningum á landsjørð. Hesi dømi vórðu øll gjøgnumgingin og afturvíst orsakað av, at umrøddu sundurbýtini vóru í tráð við galdandi byggisamtyktir. Umhvørvisstovan førdi tó prinsipalt fram, at Búnaðarstovan ikki hevur rætt at kæra í hesum ítøkiliga málinum, og vísti til rættarpraksis. Kærunevndin hevur enn ikki gjørt úrskurð í málinum.

*Dvørgastíggjur*
Í hesum málinum var Umhvørvisstovan kærumyndugleiki. Málið snúði seg um grannastríð, har eigarin av einum privatum vegi hevur lagt eina moldrúgvu uttanfyri eigindómin hjá einum granna, hóast hesin hevur tinglýstan atkomurætt. Niðurstøðan hjá Umhvørvisstovuni var, at moldrúgvan var at rokna sum burturkast, og kommunan tí frítt kundi burturbeina hana fyri eigarans rokning.

*Bygdarhúsið í Mykinesi*
Kærumálið er eitt úrslit av einum stríði um ræðisrættindini á bygdarfelagnum Súlan í Mykinesi. Eftir endurstovnan av felagnum bað nýggja nevndin tinglýsingina um at gera onkrar smávegis broytingar í navninum á felagnum, á fastognini felagið varðar av. Ein fyrrverandi nevndarlimur vildi hava broytingina afturførda, og tá hetta varð noktað, varð málið kært. Kærunevndin hevur enn ikki gjørt úrskurð í málinum.

Umframt omanfyrinevndu kærumál, hava onnur eisini verið í 2008. Hesi hevur fyrisitingarligi ráðgevin ikki havt beinleiðis ábyrgd av, og tí eru tey ikki nevnd í omanfyristandandi gjøgnumgongd.

*Innlitsmálið viðv. útskifting*
Í sambandi við eitt gamalt útskiftingarmál (Froðba uttangarðs), kom ein umsókn um partsinnlit frá einum av pørtunum í málinum. Málið varð fyrireikað av Lendi, viðgjørt av ráðgevanum og undirskrivað av Øssur Midjord, útskiftingarnevndarformanni. Fult innlit varð givið.

# Kort&Skráir

Við ársbyrjan starvaðust 4 fólk á deildini Kort & Skráir.

*Sverri Arge*, sum tekur sær av skanning, kopiering og at halda skil á tí stóra myndasavninum, sum Umhvørvisstovan eigur.

*Martin Sirkovsky*, sum tekur sær av teldum, forritum, kortlegging og uppmáting.

*Stein Fossá*, sum umframt at vera leiðari á deildini, eisini tekur sær av geodætiska grundarlagnum, landsadressuskránni, forritum og kortlegging.

Tann 1. nov. kom ein nýggjur maður á deildina, *Kurt A. Madsen*. Kurt er settur sum projektleiðari til serliga at uppbyggja eitt nýtt landsfólkayvirlit.

## Geodætiska grundarlagið

Tann 5. og 6. febr. 2008 varð verkstova hildin um, hvussu bøtast kann um geodætiska grundarlagið í Føroyum. Á fundinum, sum var hildin á Hafnia, luttóku 3 frá Umhvørvisstovuni, 1 frá Landsverk, 3 frá Kort- & Matrikelstyrelsen og 3 frá Danmarks Rumcenter. Úrslitið av fundinum var ein umleið 15 síður long frágreiðing, har komið var inn á, hvør skal gera hvat og nær.

Geodætiska grundarlagið er grundarlagið undir øllum uppmátingum. Tað veri seg fixpunkt og allar uppmátingar, sum byggja á fixpunkt, og tað gera allar uppmátingar. Í 3. árfjórðingi byrjaði arbeiði av álvara at bøta um geodætiska grundarlagið, sum hevði til endamáls, lutvís at bøta um grundarlagið í Føroyum, lutvís at knýta føroyska grundarlagið í eina alment góðkenda altjóða skipan.

*Uppmáting*
Umhvørvisstovan og Kort & Matrikelstyrelsen skipaðu í felag frá 28. september til 5. oktober fyri umfatandi uppmátingum av fixpunktsnetinum í øllum landinum. Arbeiðið er byrjanin til eitt gott og neyvt grundarlag undir øllum uppmátingarvirksemi.

Líknandi mátingar vórðu gjørdar í Grønlandi, Íslandi, Danmark, Noregi, Svøríki, Finlandi og í teimum Baltisku londunum í hesum sama tíðarskeiði.

Endamálið við arbeiðinum er, at knýta øll londini saman í eitt neyvt geodætiskt net. Hjá londum, sum marka upp móti hvørjum øðrum, er tað ein stórur fyrimunur at sama geodætiska net verður brúkt. Í Føroyum hevur tað eitt nú týdning fyri offshore- og umhvørvisfólk, at til ber at samstarva um landamørk í eini felags altjóða skipan.

Fyri 5 árum síðani vóru somu uppmátingar gjørdar í hinum londunum, men hetta er fyrstu ferð, at vit eru við. Tá uppmátingin var gjørd í 2003, var endamálið at knýta geodætiska netið saman við ITRF2000 (International Terrestrial Reference Frame). Síðani er ein nýggj referencuramma ITRF2005 komin, og fyri at knýta hesar skipanir saman best møguligt, eru uppmátingar gjørdar í viku 40.



*Føroyakort við uppmáldu punktunum*

Í 2003 vóru 133 punkt mátað, og nú koma so 5 punkt afturat í Føroyum. Ætlanin er at halda fram við tílíkum mátingum, og helst verða mátingar aftur gjørdar um 5 ár.

Úrslitið av uppmátingunum verður roknað í fleiri londum og samanborið. Endaliga úrslitið fyriliggur helst ikki fyrr enn um eitt ár.

*Permanent GPS*

Tann 17. sept. 2008 varð ein permanent GPS støð sett upp á skjøldurin á Umhvørvisstovuni, og síðani 19. sept. hevur støðin verið í gongd og loggað dátur hvørt sekund alt samdøgurið.



*Nýggja permanenta GPS antennan á skjøldrinum á Umhvørvisstovuni.*

Samstarv er við KMS um støðina, og allar dátur verða fluttar við FTP til teirra servara, har tær verða kannaðar, konverteraðar til standard snið (Rinex) og goymdar í allar ævir. Hóast dátur verða goymd á KMS, er ognarrætturin okkara.

Permanenta GPS støðin gevur nógvar møguleikar.

*1. EUREF Permanent Network*
Tá støðin hevur koyrt í eina tíð, er ætlanin at skráseta støðina hjá EUREF Permanent Network (http://www.epncb.oma.be/). Her fer so at bera til hjá øllum at síggja, hvussu Føroyar flyta seg í mun til onnur lond bæði í planinum og í hædd.



*Myndin vísir permanentar GPS støðir í Europa. Enn eru Føroyar ikki við.*

*2. Post processering*
Um onkur ger GPS uppmátingar, ber til at korrigera uppmátingarnar við dátum frá permanentu støðini, og harvið bøta munandi um úrslitið. Hetta kann eitt nú brúkast í sambandi við staðseting, tá flogmyndir verða tiknar. Somuleiðis ber til at brúka permanentu støðina, um onkur av eini hvørjari orsøk ikki fær fatur í síni egnu basustøð, tá uppmáting verður gjørd.

*3. RTK-uppmáting*
Ein basuradio, sum sendir við 2 W ella 35 W, er uppsett sum ger tað møguligt at gera RTK-

uppmátingar í Tórshavnar økinum uttan at skula seta sína egnu basustøð upp.  Seinni er ætlanin at víðka hesa tænastu, soleiðis at korrektiónir verða sendar gjøgnum GSM.

### Fotoflúgving 2008

Ætlanin var at taka flogmyndir í 2 ymsum støddum (upploysn 14 cm og 40 cm) í summar. Samstarv var við nógvar kommunur um hetta arbeiði.




*Føroyakort sum vísir ætlaðu fotoflúgvingina í 2008.*

Í mai og juni var rættiliga gott veður til at taka flogmyndir. Men tíverri bar ikki til hjá felagnum, sum tekur myndirnar, at koma til Føroya tá, tí at flúgvingin skuldi samskipast við flúgving í Skotlandi.

Hinar summarmánaðirnar hava líkindi ikki verið til fotoflúgving, men ein roynd varð gjørd í heyst. Flogfarið kom í Vágar 6. september og steðgaði í 3 dagar, men tíverri gjørdust ongi fotolíkindi, so tað fór avstað aftur uttan at hava fingið nakra mynd.

Helst verður roynt aftur at taka flogmyndir í 2009. Tess longri tíð gongur ímillum, tess størri verður tørvurin á nýggjum myndum. Nýggjastu myndirnar eru frá 2004.

## Kortlegging

*Grundkort og myndakort*

Kortframleiðslan í 2008 hevur ikki verið stór, og tað kemst av, at deildin hevur verið so upphongd av øðrum uppgávum, sum skuldu loysast.

Í 2008 eru grundkort og myndakort gjørd hesi støð:

- Norðskála og Oyri
- Haraldssund



*Grundkort og myndakort av Oyrarbakka*

Vónandi fer at eydnast at fáa nýggjar flogmyndir í 2009, so farast kann aftur av álvara undir kortframleiðslu.

*Onnur kort*

Í sambandi við at talið av kommunum broyttist við ársskiftið 2008/2009, hava vit gjørt eitt nýtt kommunukort, sum er tøkt á heimasíðuni. *Kommunukort 1. jan.2009*



Av øðrum korttilfari sum eisini er tøkt á heimasíðuni kann nevnast:

- Markatalsbygdir
- Sýslur
- Postnr.
- Hagakort og hagayvirlit.

**Telduskipan**

Rættiliga nógv arbeiðsorka hevur verið løgd í at velja røttu telduskipanina til stovnin. Tilboð um skipan vóru frá Landsnet, Elektron og Føroya Tele.

Í 3. ársfj. var avgerð tikin um, at Umhvørvisstovan skuldi fara við í Landsnet. Ein rættiliga stórur partur av orkuni á deildini er farin til at fyrireika hesa umlegging, og tann 6. okt. fór sjálvt skiftið fram, og nú eru øll á Umhvørvisstovuni á einum og sama neti.

Fleiri fyrimunir eru við hesi skipan samanborið við skipanina, vit áður høvdu:

- ein trygg skipan

Fyrr skuldu vit sjálvi taka backup. Nú verður hetta gjørt av Landsneti, sum tryggjar, at allar dátur verða goymdar á tryggum staði.

- ein mobil skipan

Har vit fyrr høvdu stationerar teldur, hava tey flestu nú farteldur við dockingstøð. Við fartelduni ber til at koma á datanetið hjá Umhvørvisstovuni uttan mun til, hvar tú ert.

- atgongd til e-post og kallendara

Hjá øllum ber nú til at hyggja at telduposti ella kanna sín kalendara, uttan mun til, hvar í verðini ein er staddur

- datasamband við fartelefon

Við fartelefon ber til at lesa teldupost, síggja kalendara og kontaktpersónar.

**Adressuskráin**

Adressulógin, sum ásetur, at allir bygningar í landinum skulu hava adressu, bleiv samtykt í 2002. Adressulógin gav kommununum 3 ár til at áseta hesar adressur, og sostatt áttu allar kommunur at havt adressur í 2005.

Ikki fyrr enn seint í 2004 bleiv tað í kunngerð fastsett, at Umhvørvisstovan skuldi umsita landsadressuskránna. Síðani tá hevur Umhvørvisstovan roynt at skunda undir kommunurnar at áseta adressur.

Í 2008 hava hesar kommunur fingið góðkent sínar adressur í Landsadressuskránni:

- Skopunar kommuna
- Húsavíkar kommuna
- Fámjins kommuna
- Sørvágs kommuna
- Skúvoyar kommuna
- Tórshavnar kommuna (smáar rættingar eru framvegis eftir at gera í adressunum)




*Myndin vísir, hvørjar bygdir hava góðkendar adressur. Bygdirnar, sum eru vístar við sterkum reyðum liti eru tær, sum hava fingið adressur í 2008.*




*Myndin vísir, hvussu stórur partur av postbygdunum í landinum hava adressur, og nær hesar eru góðkendar (14.02.2009).*




*Myndin vísir, hvussu stórur partur av fólkatalinum í landinum hava adressur, og nær adressurnar eru góðkendar (14.02.2009).*

## Landsfólkayvirlit

1. nov. 2008 bleiv Kurt A. Madsen, sum áður hevur starvast hjá Taks, settur sum projektleiðari á stovninum. Arbeiðsuppgávan hjá honum er at hava projektleiðsluna við uppbygging av einum nýggjum landsfólkayvirliti.

Arbeiðið við at knýta Landsfólkayvirlitið (TLY) til Landsadressuskránna (LAS) er byrjað. Tað fyrsta sum farið er í gongd við er at samskipa gøtunøvnini soleiðis, at tað *bert* ber til at brúka gøtunøvn í LFY, sum eru góðkend í LAS.

Næsta stigið verður, umframt gøtunavn, eisini at samanknýta persónar TLY við adressurnar (veganavn og húsanr.) í LAS.

## Heimasíða

Stórt arbeiði hevur verið lagt í nýggju heimasíðuna, sum opnaði tann 4. mars. Heimasíðan er rættiliga væl vitjað. Serliga fjølmiðlarnir hava eyguni við heimasíðuni, tí næstan øll tíðindi á heimasíðuni hava verið lýst og viðgjørd væl og virðiliga í útvarpi, sjónvarpi, bløðunum og á tíðindaportalum.




Her sæst talið av innleggum síðani byrjan.

| Bólkur | Innlegg |
|---|---|
| Stovnurin | 10 |
| Dálking og vernd | 42 |
| Gransking | 7 |
| Náttúrusøvn | 7 |
| Viðarvøkstur og frílendi | 4 |
| Mark og lendi | 8 |
| Kort og skráir | 16 |

Kort og Skráir hevur havt hesar 12 tíðindastubbar á heimasíðuni í 2008:

- 16-01-2008 Kanning av hond gps'ara
- 09-02-2008 Ætlan um at bøta um fixpunktini
- 06-03-2008 Fotoflúgving í 2008
- 01-04-2008 Skopuningar fáa nú adressur
- 13-06-2008 Húsavíkar kommuna fingið adressur
- 25-08-2008 Sumbiar kommuna fingið adressur
- 20-09-2008 Ongin fotoflúgving í ár
- 27-10-2008 Norðurlendsk uppmáting í Føroyum
- 27-10-2008 Fámjin fingið adressur
- 03-11-2008 Nú eru valkortini komin
- 11-11-2008 Sørvágs kommuna fingið adressur
- 07-12-2008 Skúvoy og Dímun fingið adressur

**Altjóða samstarv, ráðstevnur, skeið og fundir**
Deildin hevur verið umboðað í hesum tiltøkum:

- Norðurlendskur adressufundur í Finlandi.
- Norðurlendskur teknikarafundur í Finlandi.
- Norðurlendskur kortstjórafundur í Grønlandi.
- Skeið í Windows Server 2003.
- Fundur á CPR í Keypmannahavn um menning av nýggjum Landsfólkayvirliti.

# Lendi

Deildin hevur hesi arbeiðsøki: Matrikulin, sum er lógaráløgd fyrisiting innan umsiting av matriklum, Útskiftingin, sum er verkætlanarkjent arbeiði at bøta um raksturin av jørðini innangarðs sum uttangarðs og Lendisskipanin, sum serliga er ein hýsan av Býarskipanarnevndini.

Við árslok 2008 eru 11 starvsfólk tengd at deildini. Árið var tó heldur skiftandi á starvsfólkaøkinum. Fýra fólk eru sett í starv, ein segði upp, tvey fóru í farloyvi, tvey fóru niður í arbeiðstíð og ein økti um arbeiðstíð sína. Av íalt 14 fólkum eru bert fýra í óbroyttum starvi. Gunnleivur hevur røkt álitisstarv sum fakfelagsformaður í 10 ár, men er nú aftur í gamla starvi sínum. Henrik varð settur sum landmátari á deildini, og hálvan september byrjaði Elisabett sum málsviðgerði. Bjarni, sum hevur havt ábyrgdina av matrikulsins umsiting í ein mansaldur, valdi at fara frá sum deildarleiðara og at halda fram sum ráðgevi á deildini. Í hansara stað varð Petur settur pr. 1. aug. Connie og Julianna royna seg í øðrum arbeiði og hava báðar farloyvi í 1 ár. Arnold segði seg úr starvi og hevði sín seinasta arbeiðsdag beint fyri ólavsøku.

Tað er einki at taka seg aftur í, at hetta hevur órógvað arbeiðsgondina. Deildin er ikki minkað í vavi, men tey, ið valdu aðra leið, umboða royndir og førleikar, ið ikki bert í eini handavending fáast aftur, og tað var seinna hálvár í 2008 merkt av. Søkt varð í heyst eftir landmátara - eisini í útlondum. Thorbjörn, sum byrjar 2. mars 2009, er eins og Henrik úr Svøríki.

Eitt málsøki er lagt aftur at deildini. Talan er um fyrisitingaruppgávu á lendisskipanarøkinum, sum í fyrstu atløgu snýr seg um at hýsa Býarskipanarnevndini og røkja skrivarauppgávur hennara. Avbjóðingin verður at fastleggja lutin hjá Umhvørvisstovuni í planleggingarhøpi, og saman við øðrum aktørum á økinum - innanhýsis sum uttan fyri stovnin - at lyfta føroyska lendisskipan upp á eitt hægri og dyggari støði.

Tað var neyðugt at gera raðfestingar í dagliga arbeiðinum, sum hava havt við sær, at lítil og eingin orka var at seta inn á útskiftingarøkinum. Heldur ikki viðvíkjandi lendisskipanunum varð nærhendis nóg mikið avrikað. Menningin av deildini og arbeiðsøkjum hennara skal fremjast samstundis við dagligu málsviðgerðina. Hetta er bara gjørt í lítlan mun, men arbeiðið við endurskoðan av matrikullógini og tinglýsingarkunngerðini eru gott dømi um, at tað hóast alt hevur borið til. At áhugi og engagement er á tí fakliga økinum hava m.a. eisini teir regluligu deildarfundirnir víst.

### Matrikulin

Í yvirlitinum niðanfyri, sum vísir gongdina í sakartalinum, sæst, at mongdin av málum í umfari er rættiliga stór, og at hon heldur er vaksin enn minkað í árinum, sum fór.

Orsøkirnar kunnu vera so mangar, og sakartalið í sær sjálvum er eingin eintýdd ávísing, tí tað er so ymist, hvat liggur í einstaka málinum av arbeiði. Tað kann m.a. lesast í samanteljing niðanfyri.

At talið á opnum málum er høgt, er ikki óvanligt, hóast vit nú liggja í hægra lagi. Men eyðvitað er hetta tyngjandi fyri deildina, og ikki ein nøktandi støða at vera í hjá okkum sjálvum, og tíansheldur fyri viðskiftafólk okkara. Tí verður alsamt hugt eftir, hvussu sakartalið fæst niður, og serliga, hvussu tey eldru málini kunnu fáast frá hondini.

Eitt átak varð fyrrapartin av árinum gjørt, at fáa avgreitt tey elstu málini. Hetta gekst væl, men tá manningarstøðan broyttist, datt royndin niðurfyri.

**Gongdin í sakartalinum:**

| | | sakartal | avgreiddar í 08 | í umfari |
|---|---|---|---|---|
| støðan við árslok | | | **357** | **538** |
| stovnaðar | 2008 | **367** | 131 | 236 |
| - | 2007 | 433 | 135 | 129 |
| - | 2006 | 436 | 45 | 58 |
| - | 2005 | 419 | 19 | 35 |
| - | 2004 | 446 | 11 | 27 |
| eldri enn | 2004 | | 16 | 53 |

Í tølunum eru útskiftingarnar ikki við.

Umframt arbeiði við vanligum broytingum eftir matrikullógini - sundurbýti, samanleggingar, marknaumskipanir og marknasetingar - fevnir matrikulsins umsiting eisini um annað virksemi:

*Eigaríbúðir*

Uppbýti av eigindómum í eigaríbúðir. Í alt 4 sakir vórðu avgreiddar í 2008. Tvær vórðu noktaðar, og í hinum báðum vórðu í alt 44 eigaraíbúðir stovnaðar.

*Nýmatrikulering*

Í nøkrum førum eru eigindómsviðurskiftini ógreið, og skrásettu upplýsingarnar í tingbók og/ella matrikli loysa ikki fløkjuna. Tá ber til at gera nýggja skráseting (nýmatrikulering) eftir ásetingunum í matrikullógini § 38. Slíkar partvísar nýmatrikuleringar verða framdar í Kollafirði, í Norðragøtu, í Vestmanna og (av vøtnunum) á Sandi. Tær báðar fyrstu eru tiknar upp til dóms.

| Samanteljing | 2008 | 2007 | 2006 |
|---|---|---|---|
| eigaraíbúðir | 44 | - | - |
| ognartøkur | 3 | 0 | 27 |
| marknaumskipanir | 344 | 471 | 520 |
| sundurbýti | 164 | 195 | 245 |
| samanleggingar | 55 | 76 | 97 |
| strikaði matr. nr. | 76 | 94 | 157 |
| nýggj matr. nr. | 443 | 402 | 343 |
| marknasetingar | 15 | 10 | 22 |
| máld | 151 | 196 | 211 |
| noktað | 23 | 21 | 12 |
| fallin burtur | 31 | 13 | 37 |
| | 2,79 mill | 2,42 mill | 2,26 mill |

*Kærur*

Kærunevndin í lendismálum tók við sum kærumyndugleiki fyri Landsstýrið fyri tveimum árum síðani. Tá fráboðan verður givin um avgerð í máli, sum ikki fult gongur umsøkjaranum á møti, verður vegleitt um kærumøguleikan, og hesin møguleiki verður nýttur alt meiri. Tað er tí vorðin ein partur av arbeiðinum at viðgera kærumál. Tað er at fegnast um, at niðurstøðurnar, sum kærunevndin er komin til, higartil ikki hava broytt avgerðir okkara í málunum.

*Lógarsmíð*

Arbeitt hevur verið við at endurskoða partar av matrikullógini. Í fyrsta lagi var talan mest um lógartekniskar dagføringar, og um tiltrongd ískoyti, t.d. at opna fyri at gera sjálvstøðugar eigindómar undir verandi eigindómum.

*Landsjørð*

Seinni kom upp formligur trupulleiki viðvíkjandi frábýti av rakstrarbygningum av festijørð. Lógin um landsjørð er broytt, so hon nú heimilar sølu av slíkum bygningum, men vit halda ikki, at tað í galdandi matrikullóg er heimild at stovna nýggjar eigindómar av hesum slag. Mikið rumbul stóðst av hesum - eisini í fjølmiðlunum. Í endaliga uppskotinum um broytingar í matrikullógini, sum latin varð landsstýriskvinnuni í innlendismálum, eru neyðugar konsekvensbroytingar tí gjørdar í lógini.

*Løgtingið áhuga*

Í tveimum umførum varð møtt í løgtingsnevndum at greiða frá støðu stovnsins.

*Liberalisering*

Matrikullógin er afturhaldandi, hvat viðvíkur uppbýti av eigindómum, og tá tað kemur til jørð, er knívskorið. Hetta heldur politiski myndugleikin ikki vera í lagi, og tí hevur landsstýriskvinnan ynskt, at reglurnar um sundurbýti verða mýktar eitt sindur. Harafturat hevur Sjálvsstýrisflokkurin lagt uppskot á ting um, at tað skal bera til at býta sundur jørð, um víddin (støddin) er til tað. Eisini hesin parturin varð tikin við í lógarsmíðið. Sum eina loysn á spurninginum um, hvussu viðurskiftini skulu regulerast, er skotið upp, at sundurbýti av jørð verður tætt knýtt at, hvat kommunala lendisskipanin - góðkenda byggisamtyktin - sigur. Hetta er logiskt framhald av galdandi reglum og praksis viðvíkjandi sundurbýti av grundstykkjum til húsabygging v.m.

*Plankrav*

Samstundis er skotið upp, at broytingar eisini verða gjørdar í býarskipanarlógini, soleiðis at tað nú verður álagt kommununum at hava góðkenda lendisskipan (byggisamtykt), og at sett verður á stovn ein landsfevnandi planskrá, har allir planir verða skrásettir og staðfestir.

*Gjøldini*

Galdandi gjøld fyri matrikulerar broytingar v.m. eru ásett í kunngerð, sum nú hevur nógv ár á baki. Tørvur er á at dagføra hesi gjøld, og aftur at tí hevur politiski myndugleikin hildið, at stovnurin í størri mun eigur at vera sjálvsfíggjaður. Uppskot er tí orðað til nýggja kunngerð um gjøld í matrikulmálum.

*Óskalisváttanir*

Tá smámunaligar broytingar verða gjørdar í matriklinum, skal støða takast til, um evt. hefti í eigindóminum er til hindurs fyri, at broytingin kann fremjast. Hetta hevur verðið gjørt við sonevndum áskalisváttanum ella við relaxeringum, sum er ein nakað meiri krevjandi manna-gongd. Í samráð við peningastovnarnar er arbeitt við at bøta um hesar mannagongdir. Eitt arbeiði, sum m.a. hevur við sær, at broytingar verða gjørdar í tinglýsingarkunngerðini. Arbeiðið við lógarbroytingunum og endurskoðanini av kunngerðunum er fyriskipað av fyrisitingarliga ráðgevanum í tøttum samstarvi við Lendi.

*Eigaraupplýsingar*

Samkoyring av eigarayvirlitinum í matriklinum við nýggju tingbókina er framd, og er nú í rakstri. Munandi batar eru gjørdir, so upplýsingarnar nú eru meiri fullfíggjaðar, og so sjálv flytingin av upplýsingunum kann fara fram so sjálvvirkið sum gjørligt.

*Nýggj GPS´tøkni*

Saman við Kort&Skráum eru vit farin undir endurnýggjan av GPS-útbúnaðinum. Fyrsta útgerðin varð latin stovninum fyri árskiftið.

## Útskifting

Yvirútskiftingarnevndin við sorinskrivaranum á odda gjørdi í sambandi við kærumál um handfaringina av útskifting uttangarðs í Froðba í 2008 tann prinsipiella úrskurð, at ein útskifting er ein fyrisitingarlig tilgongd. Útskiftingarmál koma sostatt undir reglurnar í fyrisitingarlógini eitt nú viðvíkjandi dokumentatión og innliti.

Sum nevnt frammanundan varð ikki so nógv orka løgd í útskiftingararbeiðið í 2008, sum ynskiligt er. Fyrru helvt av árinum varð gjørd ein roynd at taka upp aftur arbeiðið við útskiftingini innangarðs av Hests bygd, sum steðgaði í 2006. Úrslitið var soltið, og niðurstøðan var, at fyribilsplanurin - útlegging av eigindómunum - má gerast av nýggjum. Bygdin er ikki stór, og uppgávan tí yvirkomilig, men hetta krevur, at arbeitt verður við hesum burturav.

Yvirútskiftingarnevndin gjørdi úrskurð í uttangarðsútskiftingunum í Sumba og á Eiði, sum tískil eru endaðar. Úrskurðarnir hjá útskiftingarnevndunum vórðu í stórum staðfestir. Eftir ástaðarfund í Froðba er uttangarðsútskifting har tikin upp til viðgerðar av yvirútskiftingini. Við Gjógv og í Húsavík vórðu útskiftingarfundir hildnir.

| Innangarðs útskiftingar: | | |
|---|---|---|
| bygd | byrjað | Viðmerkingar |
| **Hvalvík** | 06-1996 | Roknskapurin skal gerast endaliga upp. |
| **Kunoy** | 06-1998 | Seta mark millum hús. gerast upp. |
| **Hestur** | 01-2003 | Planurin má gerast av nýggjum. 1 ársverk. |
| **Norðskála** | 04-2003 | Er byrjað. |
| **Depil** | 07-2005 | Nevndarfundur í næstum |
| **Syðradalur** | 05-2002 | Seta mark millum hús. gerast upp. |
| **Strendur** | 10-2005 | Er byrjað. fleiri ársverk. |
| **Kvívík** | 01-2006 | Ikki byrjað. fleiri ársverk. |

4 nýggj útskiftingarmál eru reist í 2008. Innlendismálaráðið hevur fingið at vita, at nýggjur útskiftingarformaður skal uppnevnast í flestu av teimum málum, sum ikki eru endaði.

| Uttangarðs útskiftingar: | | |
|---|---|---|
| bygd | byrjað | Viðmerkingar |
| **Froðba** | 02-2004 | Bíðar eftir yvirútskiftingarúrskurði. |
| **Húsavík** | 10-2007 | Avvíst. |
| **Sørvágur** | 05-2008 | Fundur í næstum. |
| **Gjógv** | 02-2008 | Fundur í næstum. |
| **Depil** | 08-2008 | Fundur í næstum |
| **Svínoy** | 08-2008 | Fundur í næstum. |

Mál okkara er framvegis at avgreiða uttangarðsútskiftingarnar, men tær stóru innangarðs-útskiftingarnar fáa vit ikki farið undir, fyrr enn støðan á matrikuløkinum er haldgóð og støðug.

## Lendisskipan

Tað lá í hugskotinum og tonkunum aftan fyri nýggja stovnin, ið fekk navnið Umhvørvisstovan, at hann m.a. skuldi taka sær av lendisfyrisiting í yvirskipaðari og breiðari merking. Ein týdingarmikil partur av lendisskipanini her á landi er kommunala arealplanleggingin eftir býarskipanarlógini, og ein sentralur aktørur í planleggingarhøpi er býarskipanarnevndin. Síðani ársbyrjan 2008 hevur býarskipanarnevndin hildið til á Umhvørvisstovuni, og Lendi hevur havt skrivarauppgávuna hjá nevndini. 17 fundir vóru í árinum, sum fór. Teir flestu vórðu hildnir á Umhvørvisstovuni. Í alt 33 mál - størri sum smærri - eru avgreidd.

Tað er umráðandi, at leikluturin hjá deildini og stovninum verður lýstur, og neyðugar resursir lagdar afturat. Hetta er sera týdningarmikið arbeiði, og nógvar uppgávur á økinum verða ikki røktar í dag - hvørki av okkum ella av øðrum.

### *Planskráin*

Planskráin er nevnd omanfyri. Hon varð ikki veruleiki í 2008, men er ikki minni neyðug av teirri orsøk.

## Deildin

Nógvu innanhýsis flytingarnar á deildini fingu nakað av umrøðu í heyst. Vit hava tó valla funnið eina endaliga - ella bara eina varandi - loysn enn, og tí kunnu vit ikki rokna við heilt at sleppa undan flytingum í komandi tíðum.

### *Skeið og ferðing*

Á vári 2008 var Arnold á tveimum skeiðum í matrikulerari umsiting. Skeiðini vórðu hildin í Danmark. Petur luttók dagarnar 24. og 25. sept. - saman við Ronnie - á ráðstevnuni “Areal og

eiendom 2008" í býnum Ski í Noregi. Ráðstevnan varð fyriskipað av Norges Jordskiftekandidatforening (NJKF).

26. sept. varð vitjað á Kort- og Matrikelstyrelsen (KMS) í Keypmannahavn. Tá var eisini Jákup Pauli við. Vit frættu um matrikulskipanina MIA og eitt sindur um MiniMax, og so greiddu tey á sjókortdeildini eisini frá teirra royndum við "Lean" arbeiðsháttinum. 30. og 31. okt. var øll deildin saman við øllum stovninum á óførum skeiði um almenna fyrisiting á Hotel Hafnia.

*Átøk hjá deildini*

| lýsing | tíðarhvarv |
|---|---|
| • Rekruttering og menning á deildini | nú og framhaldandi |
| • Stabilitetur | nú og framhaldandi |
| • Sakartalið á rímiligt støði | 1 ár |
| • Útskiftingarnar í gongd aftur | ½ ár |
| • Arkiv og máliblød digital | 2 ár |
| • DB-grundaður matrikul | 3 ár |
| • Planskrá | 2 ár |
| • Møg. uttanhýsis tænastuveitingar | ½ ár |

| Úr punktsettu ársætlanini fyri 2008 – matrikulin | |
|---|---|
| **Fáa talið av óavgreiddum sakum niður**<br>- innanfyri eitt avmarkað áramál úr 539 sakum niður í einar 200 sakir. | Hetta er als ikki eydnast, fyrst og fremst tí manningarstøðan broyttist so nógv. |
| **Broyta matrikuleringslógina frá 1962**<br>- rationaliseringar eftir donskum leisti.<br>- Fáa samsvar ímillum matrikuleringslóg og lóg um landsjørð | Lógaruppskot er gjørt og latið IMR.<br>Danskur leistur ? Nei !<br>Landsjarðartrupulleikin verður loystur við uppskotinum. |
| **Kobla tinglýsingarforritið at matrikulskráseting** | Er framt. |
| **Skanna og skráseta mátibløð í datagrunni og knýta tey til kort og matriklar halda á** | Steðgaði tíðliga í árinum.<br>Verður tikið upp aftur eftir ársskiftið. |
| **Hagtøl fáast til vega um, hvussu nógv grundstykki eru skapt í árinum**<br>- Stødd og nýtslu, eigaraíbúðir og lutaíbúðir. | Ikki gjørt. |

| Úr punktsettu ársætlanini fyri 2008 – útskiftingin | |
|---|---|
| Enda uttangarðsútskiftingina í Blæing, Heimaripartur, **Sumba** | Er framt. |
| Leggja fram ein endaligan plan í **Hesti** | Miseydnaðist. Neyðugt at gera arbeiðið av nýggjum. |
| Markini í **Kunoy** og **Syðradali** eiga at verða sett | Verður gjørt tíðliga í 2009. |
| Gera neyðugar uppmátingar á **Norðskála** og í **Depli** | Verður raðfest í 2009 |
| Innangarðsútskiftingar á **Strondum** og **Kvívík** fyrireikast | Hetta megna vit ikki. Kanna støðuna í heyst. |
| **Uttangarðsúskiftingar** arbeiðast við so hvørt | Verður gjørt. |
| Siga úrskurð Fyri oman Rætt við **Gjógv** innan árslok | Verður gjørt tíðliga í 2009. |

| Úr punktsettu ársætlanini fyri 2008 – lendisskipan | |
|---|---|
| Samskipa virkisemið hjá Býarskipanarnevndini við arbeiðið annars á stovninum | Í lítlan mun gjørt. |
| Stovnurin yvirtaka skrivarafunktiónina | Ikki gjøgnumført. |
| **Landsplanskrá**<br>- skráseta og savna galdandi kommunalar planir<br>- gera almenna landsskrá fyri galdandi økisskipanir<br>- fyrireika ískoyti til býarskipanarlóggávuna um skráseting í landsplanskrá.<br>- gera mannagongdir fyri, hvussu planir eftir býarskipanarlógini skulu verða gjørdir. | Uppskot til broyting í býarskipanarlógini er gjørt í sambandi við endurskoðan av matrikullógini.<br>Annað er ikki gjørt. |

# Vernd

Starvsfólkini á Vernd fluttu í februar út á Argir. Flytingin gekk væl, og starvsfólkini á deildini trívast væl á nýggja stovninum. Tvey nýggj starvsfólk eru sett í starv, Lena Ziskason byrjaði hálvan august og Una Matras byrjaði tann 1. september 2008, harafturat hevur Heidi Hansen verið í starvi í tveimum umførum í 2008.

Manningin á Vernd er:
Jóhanna Olsen, deildarleiðari
Suni Petersen, umhvørvisviðgeri
Maria Gunnleivsdóttir Hansen, umhvørvisviðgeri
Eyð Eidesgaard, umhvørvisviðgeri
Lena Ziskason, umhvørvisviðgeri
Una Matras, umhvørvisviðgeri
Heidi Hansen, umhvørvisviðgeri

Tað hevur merkt arbeiðsgongdina í 2008, at deildin hevur verið undirmannað stóran part av árinum, og hevur hetta serliga havt ávirkan á arbeiðið við at gera umhvørvisgóðkenningar og at hava eftirlit við umhvørvisgóðkendu virkjunum. Eftir at nýggju starvsfólkini vóru sett, er glið komið á aftur arbeiðið við góðkenning og eftirlit av serliga dálkandi virkjunum.

Eisini hevur tað í stóran mun merkt arbeiðið á deildini í 2008, at nýggj innsatsøki blivu raðfest, serliga dagføringin av uppgerðini um útlát av veðurlagsgassum og arbeiðið við at gera virkisætlanina *Skjótt syftir seiðir og tunga takið* hava kravt nógva arbeiðsorku. Harafturat domineraði flytingin frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni til Umhvørvisstovuna arbeiðið á deildini í stóran mun teir fyrstu mánaðirnar av árinum.

**VEÐURLAGSØKIÐ**
Við ársbyrjan í 2008 var veðurlagsøkið ikki eitt økið, sum fylti nógv í ársætlanini hjá Vernd. Tó vísti tað seg skjótt, at veðurlagsøkið bleiv eitt arbeiðsøki, sum í stóran mun setti dám á arbeiðsinnihaldið – dagføring av veðurlagshagtølunum og tilevnanin av virkisætlanini *Skjótt syftir seiðir og tunga takið* fylti stóran part av dagliga arbeiðsdegnum á deildini. Harafturat hevur deildin verið virkin í mun til fyrireikingararbeiðið til ST veðurlagsráðstevnuna, sum verður í Keypmannahavn í desember 2009.

*Skjótt syftir seiðir og tunga takið*
Síðst í apríl mánað 2008 samtykti Føroya Landsstýri at gera eina virkisætlan, hvørs endamál er at mæla til íverksetan av tiltøkum, sum kunnu minka um útlátið av veðurlagsgassi. Táverandi Løgmálaráð heitti á Umhvørvisstovuna um at hava formansskapin í einum verkætlanarbólki, sum skuldi tilevna virkisætlanina.




Í verkætlanarbólkinum vóru umboð fyri viðkomandi aðalráð og stovnar, og arbeiðið at tilevna virkisætlanina gekk væl. Virkisætlanin *Skjótt syftir seiðir og tunga takið* bleiv alment løgd fram á veðurlagsráðstevnuni á Hotel Føroyum 15. desember 2008. Móttøkan av virkisætlanin var sera positiv.

*Fyrireiking til COP15*
Vernd hevur luttikið í norðurlendska COP 15 arbeiðsbólkinum. Bólkurin varð settur fyrst í 2008, og hevur til endamáls at fáa fram norðurlendsk sjónarmið og uppskot til altjóða veðurlagsráðstevnuna í Keypmannahavn í 2009, COP 15.

Í desember luttók umboð fyri Vernd, saman við Innlendismálaráðnum, løgmansskrivstovuni og tveimum umboðum fyri løgtingið, á fjúrtandu altjóða ST veðurlagsráðstevnuni í Poznan í Pólandi, COP 14. Eitt av fremstu málunum á ráðstevnuni var at fyrireika nýggju veðurlagsavtaluna, sum ætlandi skal samtykkjast í Keypmannahavn móti ársenda 2009, og sum skal avloysa Kyoto protokollina. Hóast stór ósemja tykist vera millum heimsins lond um avtaluna, var semja um at arbeiða víðari við ætlanini.

**GÓÐKENNING OG EFTIRLIT VIÐ SERLIGA DÁLKANDI VIRKJUM**
Arbeiðið við at gera góðkenningar og at hava eftirlit við teimum umhvørvisgóðkendu virkjunum, er tað mest arbeiðskrevjandi arbeiðsøki á deildini.

Vanlig praksis hevur verið, at kommunur hava eftirlit við teimum serliga dálkandi virkjunum, sum enn ikki eru umhvørvisgóðkend. Herfyri gjørdi deildin eina tulking av eftirlitsheimildunum í umhvørvisverndarlógini, og niðurstøðan varð, at Umhvørvisstovan er eftirlitsmyndugleiki hjá øllum serliga dálkandi virkjum, eisini teimum ikki góðkendu virkjunum, tvs. øllum skipasmiðjum, grótbrotum, bryggjaríum, reinsaríum osfr.

*Umhvørvisgóðkenningar*
Í 2008 hava sjey virki fingið umhvørvisgóðkenning. Fleiri umsóknir til umhvørvisgóðkenning eru undir viðgerð, og verða hesi virki umhvørvisgóðkend fyrsta ársfjórðing í 2009.

Yvirlit yvir umhvørvisgóðkendu virkini:

| | |
|---|---|
| Burturkast | Jarnmóttøkan hjá Tórshavnar kommunu |
| | Grótbrotið Úti í Vík í Leirvík |
| | Umlastingarstøð og fyribils timburgoymsla á Gjánoyri |
| Smoltstøðir | p/f Faroe Salmon, Húsar |
| | p/f Marine Harvest Faroes, Hellurnar |
| | p/f Fútaklettur á Fútakletti |
| | p/f Vestlax á Viðareiði |

*Eftirlit*
Í 2008 hevur eftirlit verið á 15 virkjum. Harafturat hava 8 vitjanir ella fundir verið við virkir, sum hava søkt um umhvørvisgóðkenning.

Yvirlit yvir eftirlit/vitjanir á virkjum:

| |
|---|
| Løvubetong |
| Articon, betongblandistøð |
| J & K betongblandistøð |
| Kanjon, betongblandistøð |
| Suðurbetong, betongblandistøð |
| Betongblandistøð, J+H, v. Anbjørn Hansen, Leirvík |
| Betongblandistøð, MTV-byggivirkið |
| Niðursjóðingarvirkið, Kovin, Sandavágur |
| Seanergy, Eiði |
| Laksavirkið, Faroe Processing, Klaksvík |
| Laksavirkið, Luna, Sørvágur |
| Frystimiðstøðin, Vágur |
| Faroe Apama, Vágur |
| Fiskavirkið, Atlantic Biotechnology, Oyri |
| Smoltstøð, p/f Fútaklettur |
| Laksavirkið, Faroe Farming, Vágur |
| Havsbrún |
| Umlastistøð, IRF, Trøllavík |
| Tyrvingarpláss, IRF, Trøllavík |
| Evjupláss, IRF, Trøllavík |
| Smoltstøð, p/f Hovsá, Vatnsnesvatn |
| Goymsla av roykburturkasti, Hvalvík (IRF og KB) |

## BURTURKAST
Burturkast er framvegis eitt stórt øki, har tað javnan henda dagføringar og broytingar. Burturkastnøgdirnar fylgja búskaparstøðuni í landinum. Tá tíðirnar eru góðar, økjast burturkastnøgdirnar, meðan tær minka, tá tíðirnar gerast verri. Bæði IRF og KB siga, at í seinna parti av 2008 merkist ein minking í nøgdunum. Tó eru burturkasthagtølini fyri 2008 ikki tøk enn, so enn eru ongi tøl sett á.

Kapasiteturin á brennistøðini hjá IRF er ov lítil, og tí hevur IRF lagt ætlan um at útbyggja brennistøðina fyrst í 2009. Fyri at útbyggja brennistøðina, má hon liggja still í eitt tíðarskeið. Tí hevur IRF søkt og fingið umhvørvisgóðkenning til eina fyribilsgoymslu av burturkastinum, sum kemur inn í tíðarskeiðinum, meðan brennistøðin liggur still. Harumframt fær umlastingarstøðin á Gjánoyri eina dagføring, har umhvørvisgóðkenning er givin.
KB hevur fingið umhvørvisgóðkenning til Jarnmóttøkuna, har bilskrott fáa umhvørvisviðgerð, áðrenn tað verður kroyst.

Ein umsókn frá IRF um loyvi til flutning av roykgassburturkasti frá báðum brennistøðunum er komin í 2008. Loyvið er ikki komið endaliga upp á pláss enn. Vit hava fingið okkara egnu umsóknarbløð til hetta, sum eru í brúk fyri fyrstu ferð til henda flutningin.

**TILBÚGVING**

Arbeiðið at gera føroyska landstilbúgvingarætlan móti olju- og kemikaliidálking á sjónum byrjaði á heysti 2007, og hevur eisini í 2008 verið arbeitt við ætlanini. Umframt Vernd hava umboð fyri Innlendismálaráðið, Tilbúgvingarstovnin, Fiskiveiðieftirlitið og MRCC/TR luttikið í arbeiðinum.

Av ymiskum orsøkum hevur arbeiðið ligið stilt part av 2008, men er arbeiðið nú komið so væl áleiðis, at fleiri av teimum mest grundleggjandi skjølunum í ætlanini eru at meta sum liðug. Í november 2008 var framløga fyri landsstýriskvinnuni Anniku Olsen um ætlanina.




Landstilbúgvingarætlanin verður eftir ætlan liðug í fyrsta ársfjórðingi 2009.

**OLJUDÁLKINGAR**
Oljudálkingar hava verið rættiliga støðugur partur av arbeiðinum á deildini á ymiskar mátar. Yvirskipaða málið er sjálvsagt at minka um talið av dálkingum. Fyri at náa hesum, var í 2008 millum annað heimild fingin til at gera sektaruppskot og arbeitt við at betra um skrásetingarnar av dálkingum. Yvirhøvur er ynski um at gera betri uppfylgingar á dálkingar, serliga dálkingum á ábyrgdarøki landsins. Ein fyritreyt er, at fráboðanirnar koma stundisliga, og í so máta er tað eitt stig á leiðini, at MRCC nú er farið at senda fráboðanir beinleiðis til vernd@us.fo, tvs. at øll á deildini fáa boðini inn á fartelefonina beinanvegin, MRCC hevur sent teldupostin.

*US hevur fingið heimildina at geva sektaruppskot ísv oljudálkingar*
Innlendismálaráðið gav í 2008 Umhvørvisstovuni eina generella heimild at fyrisita partar av havumhvørvislógini, herundir at hava eftirlit við, at reglur, sum eru settar í gildi við heimild í lógini, verða hildnar, at fremja rannsóknir og at gera kanningar umborð á skipum, og at geva fyrisitingarlig sektaruppskot fyri oljudálking á sjónum.

Heimildin, at geva fyrisitingarligt sektaruppskot, varð brúkt, tá ein russiskur trolari fekk sektaruppskot uppá kr. 25.000,- fyri brot á grein 7 í havumhvørvislógini um at dálka havið við olju. Reiðaríið tók við sektaruppskotinum.

Hetta hendi í mai mánað, tá danska sjóverjuskipið Hvidbjørnen kom fram á stóran oljublett norðan fyri Føroyar og tók sýni av oljuni. Við hjálp av fylgisveinaeftirliti varð staðfest, hvørji skip vóru í økinum, og tá eitt av hesum skipum dagin eftir kom í føroyska havn, fór Umhvørvisstovan saman við Fiskiveiðieftirlitinum og løgregluni umborð at taka sýni. Aftaná, at sýnini frá skipinum og av sjónum vóru kannað og samanborin, var greitt, at talan var um somu olju, og at oljan á sjónum stavaði frá russiska trolaranum.

*Skrásetingar av oljudálking*
Talið av fráboðanum, sum eru komnar frá MRCC, eru síðani 2001 skrásettar. Sí mynd niðanfyri. Í 2008 fekk US í alt 23 fráboðanir um oljudálkingar. Tað er færri enn undanfarna ár, men hægri enn í 2005 og 2006.




Í 2008 varð farið víðari á skrásetingarøkinum við at fylgja upp á allar dálkingar, sum vórðu fráboðaðar í 2007. Vernd sendi í januar 2008 brøv til 13 reiðarí, virki og onnur, sum sambært fráboðanini frá MRCC høvdu ábyrgd av eini av oljudálkingunum í 2008. Í brævinum var biðið

um nærri upplýsingar um dálkingina. Endamálið við kanningini er at økja vitanina um, hvørjar orsøkirnar eru, hvat er gjørt eftirfylgjandi, og hvat kann gerast fyri at minka um talið av dálkingum. Aftur í apríl 2008 vórðu brøv somuleiðis send til kommununar, har oljudálkingar høvdu verið í 2007, fyri at fáa nærri upplýsingar. Arbeiðið við at gjøgnumganga innkomnu svarini og gera niðurstøður er ikki liðugt. Tó er staðfest, at teknisk viðurskifti, so sum at ventilar standa skeivt og væntandi mannagongd fyri viðlíkahaldið - hol er á tangum og slangum - er vanlig orsøk til dálkingarnar, og at tað tí hevði borið til at sloppið undan teimum.

*Oljukanningar í Vági og frágreiðing*
Tann 6. desember í 2006 kom hol á ein tungoljutanga hjá SEV í Vági. Ein partur av oljuni rann á sjógv. Við heimild í grein 40 í umhvørvisverndarlógini varð álagt SEV at gjalda fyri kanningar á Vágsfirði. Talan er helst um fyrstu ferð, at henda greinin er brúkt.
Fyri at meta um skaðan, sum oljudálkingin á Vágsfirði hevði á fjørðin, varð innihaldið av polysykliskum aromatiskum hydrokarbonum (PAH) kannað í kræklingi, í sjónum og á botninum í Vágsfirði. Eisini varð innihaldið av olju í sjógvi kannað.
Kanningarnar vórðu framdar í trimum umførum, á leið 3, 6 og 16 mðr eftir óhappið. SEV rindaði kostnaðin fyri fyrsta part av kanningunum, Heilsufrøðiliga starvsstovan fyri annan og Umhvørvisstovan fyri triðja part.
Síðani seinastu úrslitini frá PAH analysunum vórðu móttikin á heysti 2008, hevur verið arbeitt við at skriva eina frágreiðing um kanningarnar á Vágsfirði. Frágreiðingin verður liðug í februar 2009.

## SVIMJIHYLJAR

Eftirlitið við svimjihyljum verður framt smb ásetingum í kunngerðini um umhvørvisreglur. Tað er Heilsufrøðiliga starvsstovan, sum fremur eftirlit fyri Umhvørvisstovuna. Tað eru í alt 23 svimjihallir, og eftirlit var á 19 av hesum í 2008.

## UMHVØRVISHAGTØL

Í 2008 fekk Umhvørvisstovan eina fíggjarliga raðfesting, sum m.a. skuldi brúkast til at framleiða umhvørvishagtøl. Umhvørvishagtøl hava stóran týdning fyri at meta um støðuna hjá umhvørvinum, og hvussu gongdin er í dálkingarstøðuni.

*Útlát av veðurlagsgassi*
Føroyska útlátið av veðurlagsgassi varð dagført í 2008. Í apríl varð ein dagføring gjørd fyri 1990-2006. Stórur áhugi var fyri tølunum, helst tí hetta var fyrsta dagføring síðani 2003. Løgtingið og Landsstýrið vóru á Umhvørvisstovuni til ein kunnandi fund um veðurlagsshagtølini, umframt at ein tíðindafundur varð hildin. Vinnuhúsið var eisini kunnað um tølini á fundi.

Í sambandi við uppgerðirnar í 2008 varð førleikin at gera útlátsuppgerðina mentur á deildini, so heldur enn at brúka eksterna ráðgeving, kunnu vit nú sjálvi gera tølini upp. Í apríl var fundur hildin við DMU, mest um uppgerðteknisk viðurskifti. Listi er gjørdur yvir viðurskifti, sum framyvir skulu mennast, so uppgerðin í alt størri mun er í tráð við altjóða IPCC vegleiðingar.




*Ozon*
Í 2008 var fimta árið á rað, at Umhvørvisstovan hevur gjørt uppgerð yvir føroyska útlátið av ozonoyðarum. Fyri fyrstu ferð kunnu vit siga, at uppgerðin gevur eina nøkulunda fullfíggjaða mynd. Hetta var eisini fyrsta árið, at vit gjørdu meira burturúr at spyrja innflytararnar um, hvør keypari teirra er.




Fyri at fáa neyvari upplýsingar um HCFC-22 nýtsluna í Føroyum, vórðu spurnabløðini til innflytararnar víðkað við fleiri spurningum. Svarini vístu, at 68% av søluni av HCFC-22 í 2007 var til føroysk skip, og talan var einans um nýframleitt HCFC-22, sum annars er ólógligt at selja í grannalondunum. Táverandi landsstýriskvinnan í umhvørvismálum mælti til, at reglur vórðu gjørdar til at minka um føroyska útlátið av osonoyðandi evnum.
Í september 2008 varð fundur hildin við Miljøstyrelsen, m.a. um reglur um at minka um útlát av ozonoyðandi gassum.

*Hagtøl á www.us.fo – ein tværdeildarlig verkætlan:*
Nú umhvørvishagtøl verða raðfest, hevur verið arbeitt við at finna ein lættan og góðan máta at sjónliggera hesi á www.us.fo. Í tí samanhanginum varð hildið skilagott við eini tværdeildarligari verkætlan, hvørs mál er at finna fram til ein felags máta (tekniskt, layout etc) til at leggja diagrammir/myndir yvir hagtøl út á www.us.fo. Talan er um eina lítla verkætlan við luttøku av minst einum av hvørjari deild á US. Verkætlanin byrjaði í des. 2008, tá fyrsti fundurin varð hildin. Arbeiðið verður liðugt 1. ársfjórðing í 2009.

**ÓRUDD**
Í 2008 varð fokus sett á órudd, ið liggur og rekst ymsa staðni í Føroyum. Á heimasíðu okkara løgdu vit myndir av óruddi út, og sendu vit avvarðandi kommunum eitt skriv um at loysa trupulleikan. Um somu tíð byrjaðu eisini nakrir fjølmiðlar at hava líknandi átak, har tey koyrdu runt í Føroyum og tóku myndir av óruddi, sum tey síðani koyrdu í bløðini. Hetta vóru vit sjálvandi glað fyri, og sendu vit eisini øllum hesum kommunum eitt skriv um at loysa trupulleikan. Tilsamans fingu 20 kommunur boð um at loysa trupulleikan, og sigast kann, at hetta var eitt væleydnað átak, og vóru flestu kommunurnar glaðar fyri tað og tóku tað til sín og settu ymisk tiltøk í verk so sum felags ruddingardag.

**UMHVØRVISÁTAKIÐ 2008**
Afturvendandi tiltakið ”Best røkta bygd” fekk í 2008 nýggja heitið Umhvørvisátakið 2008, og varð í tí sambandi eisini umskipað nakað. Eins og vanligt hevur Umhvørvisstovan havt ein lim í fyrireikingarnevndini, sum setti karmarnar um átakið við at avgera, hvørjar greinar kappast skuldi um, kunna, samskipa og annars fyrireika handanina, sum var í Müllers pakkhúsi juni 2008.

Umhvørvisátakið 2008

Umhvørvisstovan hevði eisini ein lim í metingarnevndini, sum var og vitjaði støðini, sum vóru í uppskoti hesaferð. Nevndin var í Norðuroyggjum, í Suðuroy, vesturi í Vágunum og inni í Eysturoynni. Dómsnevndin helt fyrireikandi fundir, eins og tíð varð brúkt til at finna fram til vinnararnar í ymisku kappingargreinunum.

Vinnarnir vóru:
Best átak – ókeypis bussleiðin hjá Tórshavnar kommunu
Best røkta vinnuøki – Tofta havn
Sermerk náttúruøki – Hvannhagi
1. virðisløn, Best røkta bygd – Sandavágur
2. virðisløn, Best røkta bygd – Bøur
3. virðisløn, Best røkta bygd – Trøllanes

Seinni hevur Umhvørvisstovan gjørt myndafrásøgn frá vitjanunum til ein sokallaðan kveikingardag, sum Agenda 21 skrivstovan skipaði fyri kommunum í des. 2008.

*EMS-light*
EMS light-Nordic er ein norðurlendsk verkætlan, hvørs endamál er at uppbyggja eina skipan til umhvørvisstýring (Environmental Management System) á smærri virkjum. Verkætlanin fevnir um í alt umleið 30 virki og stovnar í Føroyum, Íslandi og Álandi, uml. tíggju úr hvørjum landi.

Ætlanin við umhvørvisstýring er, at virki og fyritøkur hava nágreiniligar mannagongdir fyri at avmarka ávirkanina á umhvørvið, fyri harvið at náa teimum málum, sum tey sjálvi hava sett.

Umhvørvisstovan er við í EMS-light verkætlanini, tí at vit halda, at umhvørvisstýring hevur stóran týdning í umhvørvisarbeiðinum hjá virkjum, og at virki sjálvi skulu taka ábyrgd av síni ávirkan á umhvørvið. Virki mugu sjálvi seta sær mál, fyri at minka um dálking og aðra ávirkan á umhvørvið, og arbeiða miðvíst fram ímóti hesum máli.

Fyri 2009 hevur Umhvørvisstovan sett sær hesi mál:
- Minka oljunýtsluna við 5 til 10%
- Minka elnýtsluna við 10%
- Minka pappírsnýtsluna 5%

**EINNÝTISÍLØT**
Í 2007 kom nýggj lóg í gildi, ið segði, at nú var loyvt at innflyta og selja øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir í einnýtisíløtum. Í lógini stendur eisini, at áðrenn man kann innflyta og selja einnýtisíløt, skal søkjast um loyvi til tess frá Umhvørvisstovuni. Beinanvegin fekk Umhvørvisstovan nógvar umsóknir, og í 2007 vóru givin sjey loyvi.

*Loyvi*
Í 2008 vóru einans trý nýggj loyvi givin. Tó søktu og fingu 4, ið høvdu fingið loyvi í 2007, ískoyti til loyvi teirra. Tilsamans vóru 10 ískoyti givin í 2008. Hetta merkir, at í 2008 høvdu tilsamans 10 fingið loyvi til at innflyta og selja øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir í einnýtisíløtum.

*Eftirlit*
Í 2008 fingu vit illgruna um, at øll einnýtisíløt úr plasti ikki vóru send til endurvinningar. Tískil sendu vit øllum loyvishavarum, ið hava fingið loyvi at innflyta og selja einnýtisíløt úr plasti, eitt skriv, har tey skuldu vátta, at tað var sent til endurvinningar. Tá vísti tað seg, at ein loyvishavari ikki hevði sent hesi einnýtisíløt til endurvinningar, men at tey í staðin vóru blivin brend sum burturkast. Í lógini er ásett í grein 3 stk. 7, at verða treytirnar fyri einum loyvi ikki hildnar, kann loyvið takast aftur, eins og bann kann verða sett fyri sølu av einnýtisíløtum. Umhvørvisstovan metti ikki, at tað at taka loyvið aftur loysti trupulleikan, tí innflytarin kundi bara søkja um nýtt loyvi. Tí avgjørdi Umhvørvisstovan, heldur at geva innflytaranum átalu fyri sera álvarsligt brot á loyvið. Harafturat bleiv eftirlitið við innflytaranum hert, soleiðis at innflytarin skal senda upplýsingar inn um einnýtisíløt úr plasti hvønn ársfjórðing.

**UPPSKOT TIL KUNNGERÐIR**
Seinastu árini hava fleiri uppskot til kunngerðir verið gjørd – nøkur uppskot er nærum heilt liðug, meðan onnur enn mangla nakað, áðrenn hesi eru liðug. Uppskotini eru fylgjandi:
- Kunngerð um oljutangar
- Bunkringskunngerðin
- Kunngerð um móttøkuskipanir í havnum
- VVM kunngerðin við heimild í havumhvørvislógini
- Spillivatnskunngerðin
- Kunngerð um at verandi virkir eisini skulu søkja um umhvørvisgóðkenning
- Kunngerð um taðing
- Kunngerð um gjøld

**HEIMASÍÐA OG KUNNING**
Í 2008 hevur stór arbeiðsorka verið løgd í arbeiðið at fáa nýggju heimasíðuna stovnaða. Heimasíðuarbeiðið er væleydnað, og móttøkan av heimasíðuni hevur verið sera positiv.

Vernd hevur í 2008 lagt 30 kunningarstubbar út á heimasíðuna, og roynt verður so hvørt at byggja heimasíðuna út við nýggjum síðum. T.d. er nýggj undirsíða fyri umhvørvishagtøl gjørd, har til ber at síggja diagrammir fyri ymisk útlát, serliga veðurlagsgass.

*Yvirlit yvir kunningarstubbar:*
28-12-2008 Nýggjársbál
25-12-2008 Far væl fartelefon
16-12-2008 Vel røttu jólagávuna
14-12-2008 Skjótt syftir seiðir og tunga takið
11-12-2008 Útlátið er støðugt ov høgt
05-12-2008 Trý fullteknað skeið...
20-11-2008 Nýggj krøv til Umlastingarstøð
18-11-2008 25.000 krónur í bót fyri oljudálking
03-11-2008 Trý skeið um reinsing av spillivatni
24-10-2008 Gamalt jarn kann dálka
03-10-2008 Leivdir frá fletting
16-09-2008 Stór nýtsla av ozonoyðarum
08-09-2008 Reinari luft í lungu okkara
04-09-2008 Burturkast goymast í grótbroti
20-08-2008 Enn ein smoltstøð góðkend
23-07-2008 Minst til tóma ílatið
22-07-2008 Faldari um bestu tøku tøknina
15-07-2008 Smoltstøðir góðkendar
26-06-2008 Hvannhagi vann heiðurin "Sermerkt náttúruøki"
26-06-2008 Tofta Havn vann heiðurin fyri best røkta vinnuøki 2008
25-06-2008 Vindmyllur til húsbrúk
18-06-2008 Festi í við skili
03-06-2008 Jarnmóttøka fingið góðkenning
05-05-2008 Nú er at rudda...
08-05-2008 Nýggj tøl fyri føroyska útlátið av veðurlagsgassi
25-04-2008 Børn og kemisk evni
10-04-2008 Umhvørvisátakið 2008
27-03-2008 Buglað, men ikki uttan virði
17-03-2008 Ozonlagið kann verjast betri
25-02-2008 Fyrsta svanamerkta virki

*Kunningarfaldarar*
Í apríl kom faldarin Børn og kemisk evni út. Umhvørvisstovan hevði fingið stuðul til faldaran frá játtanini til umhvørvisverndartiltøk hjá Innlendismálaráðnum. Faldarin er ein týðing av danska faldaranum "Kemi i børns hverdag" sum Miljøstyrelsen hevur givið út. Faldarin varð sendur út til millum onnur stovnar á barnaansingarøkinum, til Barnatænastuna hjá Nærverkinum og til apotekini. Frá apotekinum bleiv sagt, at sjúkrasystraskúlin hevði verið og biðið um nøkur eintøk av faldaranum. Faldarin er teldutøkur á heimasíðuni eisini. Vit hava bert fá eintøk av teimum 2000 eftir av faldaranum, og skulu taka støðu til, um vit skulu prenta eitt upplag afturat.

Umhvørvisstovan sendi 100 eintøk av faldaranum "Ren luft i vore lunger" til ymisk relevant í 2008. Í faldaranum verður serligur dentur lagdur á dálking við bitlum (partiklum).

Norðurlendskur faldari um best tøku tøknina (Best Available Techniques) bleiv týddur til føroyskt og sendur út til m.a. kommunur og vinnufeløg. Í faldaranum er greitt frá arbeiðinum hjá norðurlendska BAT bólkinum og úrslitum í norðurlendskum og altjóða høpi. Bólkurin hevur latið úr hondum fleiri faldarar og frágreiðingar um bestu tøku tøknina til ymsar vinnugreinar. Eisini verður greitt frá arbeiðinum við at fáa BAT hugtakið altjóða viðurkent og arbeiðið hjá Norðurlondum at fáa ávirkan á BAT økið í ES. Harafturat er yvirlit yvir frágreiðingar og faldarar, sum BAT bólkurin hevur gjørt.
Faldari um burturkast frá skipum er týddur til enskt og russiskt. Faldarin verður sendur út fyrst í 2009.

**SKEIÐ**
Vernd skipaði fyri trimum skeiðum, saman við Teknologisk Institut, í spillivatnsreinsing – oljuskiljarar, feittskiljarar og rottangar. Eftir undirtøkuni at meta, er tørvurin stórur fyri skeiðum, og fullteknað var til øll trý skeiðini.

Yvirlit yvir skeið, útbúgvingar v.m. eru í talvuni niðanfyri:

| | |
|---|---|
| Øll deildin | Skeið í fyrisitingarrætti (Jonhard Klettheyggj og Petur Elias Nielsen) |
| EE, HH, LZ, MGH og UM | Rottangar og feittskiljarar |
| EE, HH, LZ og UM | Oljuskiljarar |
| Jóhanna Olsen | Fekk prógv sum Master í tøkniligari-vísindaligari umhvørvismeting (Aalborg Universitet) |
| Lena Ziskason | Miljømedarbejderuddannelse, 1 modul (Den kommunale højskole) |
| Maria Gunnleivsdóttir Hansen | Grundleggjandi projektleiðara útbúgving (Skeiðsdepilin)<br>Grundskeið í Access (Kvasir)<br>Argos – teori (Beredskabsstyrelsen/FTBS) |
| Suni Petersen | Fekk prógv sum Master í orku- og umhvørvisrætti (Århus Universitet)<br>Argos – teori (Beredskabsstyrelsen/FTBS) |
| Una Matras | Miljømedarbejderuddannelse, 1 modul (Den kommunale højskole) |

**EKSTERNT SAMSTARV**

Deildin er rættiliga virkin í norðurlendskum og altjóða samstarvi á umhvørvisøkinum. Í talvuni niðanfyri er yvirlit yvir virksemi:

| | |
|---|---|
| Hav og Luft-bólkurin, NMR | Tveir fundir - apríl 2008 í Duved í Svøríki og sept. 2008 á Álandi.<br>Í sambandi við ferðirnar var fundur við DMU (um uppgerð av verðurlagsgassi) í apríl og MST í september (um uppgerð av osonoyðarum). |
| MiFi (Miljø og fiskeri) tvørsektoriellur norðurlendskur arbeiðsbólkur | Fundur í Keypmannahavn í januar |
| BAT-bólkurin (Best Available Techniques) | Fundur í Keypmannahavn í januar |
| Smásamfelagsbólkurin | Fundur í januar og desembur. Harafturat hava verið tveir telefonfundir. |
| Norðurlendsk ráðstevna um burðardygga menning | Í Odense september 2008 |
| NMR ad hoc arbeiðsbólkur um havumhvørvið | Tveir fundir – nov 2008 í Stokkholm og des 2008 í Keypmannahavn |
| Deponi | Tveir fundir – jan 2008 í Stokkholm og mei 2008 í Solheim, Íslandi |
| Lívrunnið burturkast | Tveir fundir – jan 2008 í Stokkholm og mei 2008 í Solheim, Íslandi |
| Flutning av burturkasti | Seminar 2 dagar í september 2008 |
| BAT Workshop | BAT í fiskavirkjum – workshop 1 dag mars 2008 |
| IMO | GHG-WG í Oslo í juni<br>MEPC í London í oktober |
| Norðurlendski PA bólkurin (Produkter og affald) | Stokkholm í januar<br>Áland í september |
| Norðurlendski COP 15 bólkurin | Oslo í mai<br>Keypmannahavn í juni og oktober |
| ST veðurlagssáttmálin | Veðurlagsráðstevnan COP 14 í Pólandi í desember |

Annað

| | |
|---|---|
| Oljuleiting (ENI) | Vitjan á boripallinum Vest Phoenix í Bergen í oktober 2008<br>Fundur við Eni í Keypmannahavn apríl 2008 |

# Gransking

### Aftur og fram er dupult so langt

Gransking hevur verið heldur vinglut við Náttúrugripasavninum (NGS), sum stóð á gáttini eitt longri tíðarskeið, meðan endaliga skipanin av stovninum varð diskuterað aftur og fram. Eftir drúgva tíð var greitt, at NGS skuldi fara aftur til gomlu støðuna, sum sjálvstøðugur stovnur, og greitt var, at onkur ætlan, sum hevði verið gjørd viðvíkjandi menning av deildini og innrætting av arbeiðsrúmum á Umhvørvisstovuni, skuldi hugsast umaftur. Tað var eitt sindur tungt at venda við og loysa frá løgdu kósini, men seinastu mánaðirnar av 2008 vórðu týðandi framstig gjørd við at gera arbeiðsrúm og goymslu liðug, og á leiðslu-seminarinum á Viðareiði fyrstu dagarnar í desembur var fruktagott orðaskifti um nýggju kósina fyri Gransking, nú NGS hevði tikið seg burturúr.

### Starvsfólk

Fasta kjarnin í Gransking á Umhvørvisstovuni hevur verið Maria Dam, deildarleiðari, Katrin Hoydal, vísindaligt starvsfólk, og í tíðarskeiðinum mai til septembur var Sjúrður Hammer fyribilssettur hjá okkum. Sjúrður er liðugur við B.Sc. frá Univ. Aberdeen og hevði arbeitt eitt knapt ár innan frálandsvinnuna, tá ið hann kom til okkara. Í septembur fór hann undir útbúgving aftur í Skotlandi, men hevur arbeitt av og á við ENVOFAR verkætlanini sum tímasettur, tað ið eftir var av árinum.

### Hølini verða góð!

Nógv tíð er farin til at innrætta okkum í nýggju hølunum, ikki minst at halda eyga við liðugtgerðini av starvsstovuhølunum. Nú 2008 er liðugt, kunnu vit staðfesta, at vit eru við at vera komin á mál, hvat arbeiðsumstøðum viðvíkur, og vit gleða okkum til at fáa destillatiónsanlegg og uppvaskimaskinuna, sum bleiv keypt í endanum av 2008, at virka. Eisini eru vit spentar uppá at fáa betur umstøður at fara í feltin við okkara útgerð, nú nýggjur bilur kemur í næstum.

### Samstarvsnevndir í 2008

*Norðurlendskir arbeiðsbólkar:*
Norðurlanda Ráðharraráðið hevur umskipað arbeiðsbólkarnar, sum hava virkað á umhvørvisøkinum, og harvið er NMD, bólkurin sum MD hevur luttikið í í nógv ár, farin í søguna.

Arbeitt hevur verið við trimum verkætlanum, sum hava havt stuðul úr Norðurlanda Ráðharraráðnum, sí Talvu 1.

Granskingarnevnd: Frá 1/9/08 tók Maria Dam sæti í Granskingarnevndini, sum setur í verk granskingarpolitikkin hjá Vísindaráðnum og annars umsitur granskingarstuðul úr Granskingargrunninum.

**Verkætlanir, Útgávur, Upprit og Kunning**

Verkætlanir, sum hava verið aktivar í 2008, eru vístar við heiti, verkætlanarleiðara á US og ein stutt lýsing av endamálinum í **Talva 1**.

Talva 1 Verkætlanir, sum arbeitt hevur verið við á Gransking í 2008.

| **Heiti** | **Verkætlan-leiðari*** | **Endamál** | **Viðmerkingar** |
|---|---|---|---|
| Arctic monitoring and assessment programme, AMAP | Maria Dam | AMAP er altjóða eftiransingarskipan í norðaru pørtum av heimspørtunum rundanum norðaru helvt av knøttinum, sum Arktiska Ráðið hevur umbiðið.<br>Endamálið er at kanna útbreiðsla og árin av umhvørvisdálkandi evnum, sum serliga stava frá ídnaðarøkjunum longur suðuri. Kanningarparturin, sum US stendur fyri, fevnir um tungmetal og evnir, sum hópast upp í náttúruni, sum td. PCB. | Frágreiðing frá 2005 og framyvir hevur verið gjørd í 2008, og verður liðug tíðliga í 2009.<br><br>Arbeitt hevur verið við at avdúka, um broytingar (els: minking) eru í innihaldinum av POPum í fiski, hvali, fugli o.a. í 2008.<br><br>AMAP kanningin er fíggjað av Miljøstyrelsen. |
| Screening av nýggjum, dálkandi evnum | Maria Dam | Norðurlanda samstarv um kanningar av heilsu- og umhvørvisskaðiligum evnum, sokallað nýggj dálkandi evnir. Evnini, sum vera kannað, eru sum heild ikki reguleraði, tí kunning vantar um útbreiðsluna av evnunum. Endamálið við kanningunum er at vera við til at vaksa um kunnleikan um nýggj, dálkandi evnir í umhvørvinum, soleiðis at neyðug stig til at minka um útleiðingina kunnu verða tikin. | Frágreiðingar, sum hava verið skrivaðar um møgulig nýggj, dálkandi evnir, eru til taks á http://www.ust.is/ness/activities.html Í 2007 varð frágreiðing um fenolir (bis/tetrabis/ocyly/nonyl/dodecyl) útgivin.<br><br>Kanningin er fíggjað av arbeiðsbólkinum hjá Norðurlanda Ráðharraráðnum og luttakandi stovnum úr Finlandi, Svøríki, Danmark, Noreg, Ísland og Føroyum í felag. |
| Passive samplers (NMR; tungmetallir, PAH og PCB | Maria Dam og Katrin Hoydal | Norðurlanda samstarv, sum stuðlar uppundir OSPAR JAMP kanningarskránna, har umhvørviseitur í sjónum í norðureystur Atlantshavinum og Norðsjónum verða kannað. | Væntandi verður felags frágreiðing liðug í fyrstu helvt av 2009. Verkætlanin er fíggjað av Norðurlanda Ráðharraráðnum, og hevur luttøku úr Svøríki, Noregi, Danmark og Føroyum. Hollendskir granskarar luttaka sum kanningarserkønir. |
| Oljudálking aftaná Olshana og oljuleka í Vági | Maria Dam og Katrin Hoydal | Kanningin hevur til endamáls at avdúka, í hvønn mun oljudálkingin, sum stóðst av at Olshana sakk í aug 2007, hevur havt negativt árin á djóralívið í økinum, við serligum atliti til tosk. | Verkætlanin er eitt samstarv við Heilsufrøðiligu starvsstovuna, har vitanin um oljudálking í føroyska umhvørvinum verður presenterað. |
| Havnarvág 2007/2008 – lýsing av dálkingarstøðuni | Maria Dam | Tórshavnar kommuna hevur fingið gjørt kanningar av dálkingarstøðuni á Havnarvág í tveimum umførum, fyrstu ferð í 1987 og seinnu ferð í 2002. Kanningin í 2002 vísti, at dálkingarstøðan var partvís sera ring, og tí varð avrátt at endurtaka kanningina, fyri at vita um atgerðir, sum hava verið tiknar seinastu árini, hava bøtt um støðuna. | Ein kanningarskrá við støði í fyrru kanningunum varð gjørd, og sediment-sýnir vóru tikin í 2008. Væntandi er at kanningar halda á fram í 2009. |
| Klaksvíkar vág og Grótrætt-umhvørvisstøðislýsing | Maria Dam | Gerð av kanningarætlan fyri at lýsa umhvørvisstøðuna á vágni og rundanum Grótrætt. | Eftir umbøn frá umhvørvis-leiðaranum í Klaksvíkar kommunu, varð kanningarætlan gjørd við tí endamáli, at fáa lýst umhvørvis-støðuna á vágni og rundanum |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | | Grótrætt. Sýnistøka av sjógvi, sedimentum og fiski varð gjørd, og kanning av vatnsýnum framd. |
| ENVOFAR | Maria Dam | Í samstarvi við NGS og FRS verða umhvørvisdáta, sum eru framleidd í AMAP ella CAFF høpi, gjørd almenn og atkomilig á alnótini. | Stuðlað av Innlendismálaráðnum. |
| Nýggj dálkandi evnir í havsúgdjórum | Maria Dam | Samstarv millum FO, N, IS, DK/GR og S um kanningar av bromeraðum flammutálmandi evnum í havsúgdjór frá tíðarskeiðinum 1980-unum og til í dag. | Verkætlanin er stuðlað av Norðurlanda Ráðharraráðnum, umvegis arbeiðsbólkurin Hav og Luft. |

* Í onkrum føri, t.e. í millumlanda verkætlanir, kann verkætlanarleiðarin finnast uttanfyri Føroyar, tá er verkætlanarábyrgdarhavari á Umhvørvisstovuni nevndur her.

Talva 2 Útgávur í 2008, har Gransking hevur luttikið aktivt.

| **Fágreiðing** | **Høvundar** | **US frá-greiðing nr.** | **US Málnr.** |
|---|---|---|---|
| Phenols (bis/tetrabis/ocyly/nonyl/dodecyl) in the Nordic environment http://nordicscreening.org/index.php?module=Pagesetter &tid=5 | Asger B. Hansen and Pia Lassen, National Environ-mental Research Institute, Tema Nord 2008:530 | | |
| Í gerð:<br>Bromerað flammu-tálmandi evni í føroyskum mati | Dam, Maria og Hoydal, Katrin. | | |

Talva 3: Annað virksemi /onnur produktir

| **Virksemi** | **Hvar** | **Tema** | **Viðmerkingar** |
|---|---|---|---|
| Ráðstevna | Oslo, Statens Forurensnings Tilsyn | Workshop on Pharmaceuticals and Personal Care Products (PPCPs) | Ráðstevnan varð skipað fyri av arbeiðsbólkur ”Joint Nordic Screening” har US luttekur aktivt. Luttakarar úr øllum Norðurlondum vóru bjóðaðir, harímillum úr Føroyum. |
| Sjónvarpsframløga | KVF, Speki | | |
| Dáta portal | www.envofar.fo | Umhvørvisdáta fyri Føroyar | Í samstarvi við NGS og FRS verður umhvørvisdáta sum er framleitt í AMAP ella CAFF høpi gjørt almenn og atkomilig á alnótina. |
| NMD summarfundur | Akraberg, vitapassarahúsið | Summarfundur viðgjørdi ma. ársætlan fyri 2009 og nýtt Miljøhandlingsprogram | NMD bólkurin varð síðani niðurlagdur frá 31/12-2008. Seinasti fundur var í Keypmannahavn í dec. 2008. |
| Nýggj dálkandi evnum í havsúgdjórum | Hjá okkum á US. | Bólkurin fekk tillutað partvís fígging til eina størri kanningarætlan og skuldi tillaga arbeiðsætlanina til nýggju karmarnar. | Arbeiðið heldur væntandi fram í 2009, men er í bíðistøðu, meðan nýggju arbeiðsbólkarnir í Norðurlanda Ráðharraráðnum verða skipaðir. |

**Portalkunning 2008**
Í 2008 varð kunnað um nýggheitir innan Gransking

**Tabel 3 Kunningarstubbar hjá Gransking á portalinum hjá US í 2008.**

| **Útkomið** | **Heiti** |
|---|---|
| 13-6-08 | Fenol í føroyska umhvørvinum |
| 17-9-08 | Umhvørviseitur í náta |
| 1-12-08 | Er umhvørviseitur í hvali minkandi? |

# Viðarvøkstur & frílendi (V&f)

Materiella heimildin fyri virkseminum liggur í Ll. nr. 53 frá 27. november 1952 um viðarlundir, sum seinast broytt við løgtinslóg nr. 110 frá 29. juni 1995. Sambært skrivi frá Skógfriðingarnevndini til Føroya landsstýri á heysti 1987 varð avrátt, at umsitingin av virkseminum varð løgd til almenna stovnin Skógrøkt landsins, og Skógrøktin gjørdist 1. juni 2007 partur av Umhvørvisstovuni, deildin fyri Viðarvøkstur og frílendi (US-V&f).

Umframt at umsita tær jarðir, ið antin Skógfriðingarnevndin ella Skógrøktin eru beinleiðis tinglýstir ánarar av, umsitur deildin eisini jarðir, ið Landsstýrið hevur lagt higar at umsita. Somuleiðis er við Skraddaratrøðni í Mið Hoydølum, ið Skógfriðingarnevndin langtíðarleigar frá Tórshavnar kommunu fyri tíðarskeiðið 1978 – 2078, har Gróðurstøðin verður rikin við m.a. plantuskúla og arboretvirksemi. Við heimild í Ll. um viðarlundir eru friðingarbrøv um skógfriðin tinglýst sum servituttir á allar tær viðarlundir í landinum, har Skógfriðingarnevndin hevur yvirumsjón og V&f tí hennara vegna innir umsitingarmyndugleikan.

Niðanfyri er eitt lendisyvirlit fyri tær jarðir, ið US-V&f umsitur heilt ella lutvíst.

**Talva nr. I.**
**Yvirlit yvir jarðir, ið Skógfriðingarnevndin ella Skógrøkt landsins eiga ella langtíðarleiga.**

| Matr. nr. | Býur/bygd | Vídd, m$^2$ | Ánari | Skógfriðað | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|---|
| 1[b], Kirkjubø | Kirkjubø | 22.280 | Skógfriðing-arnevndin | Ja | Viðarlundin inni í Dølum. |
| 108, Selatrað | Selatrað | 15.500 | Skógfriðingar-nevndin | Ja | Viðarlundin á Selatrað |
| 1338, Tórshavn | Tórshavn | 28.706 | Tórshavnar kommuna | Nei | Gróðurstøðin í Mið Hoydali |
| 1[nh], Hoyvík | Hoyvík | 40.641 | Skógrøkt lands-ins | Ja | Viðarlundin í Langadali. |
| 49[a], Hoyvík | Tórshavn | 20.900 | Tórshavnar kommuna | Nei | Gróðurstøðin í Mið Hoydali |
| 122[c], Trongis-vágur | Trongisvágur | 1.793 | Skógfriðingar-nevndin | Nei | Viðarlundin í Trongis-vági |
| 633, Froðba | Tvøroyri | 619 | Skógfriðingar-nevndin | Ja | Garðurin á Sevmýru |
| 634, Froðba | Tvøroyri | 1.025 | Skógfriðingar-nevndin | Ja | Garðurin á Sevmýru |
| | **Lendi íalt** | **93.684 m$^2$** | | | |

**Talva nr. II.**
**Yvirlit yvir jarðir, har Skógfriðingarnevndin ella US-V&f hevur yvirumsjón sbrt. tinglýstari skógfriðingarskyldu ella aðrari servituttbinding e.l. ásetingum.**

| Matr. nr. | Býur/bygd | Vídd, m$^2$ | Ánari | Skógfriðað | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|---|
| 105, Hvalvík | Hvalvík | 6.600 | Sunda kommuna | Ja | Viðarlundin í Hvalvík |
| 1621, Klaksvík | Klaksvík | 30.815 | Klaksvíkar | Ja | Viðarlundin úti í Grøv |

| Matr. nr. | Býur/bygd | Vídd, $m^2$ | Ánari | Skógfriðað | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|---|
| | | | kommuna | | |
| 1651[c] | Klaksvík | 15.645 | Føroya Jarðargrunnur | Nei. Leigusáttmáli um viðarlund. | Viðarlundin úti í Grøv. Kl. komm. leigar lendið til viðarlund. |
| 31, Kunoy | Kunoy | 7.931 | Kunoyar komm-una | Ja | Viðarlundin í Kunoy |
| 384, Leirvík | Leirvík | 15.130 | Ognarhagin | Ja | Viðarlundin í Leirvík |
| 233[a], Miðvágur | Miðvágur | 14.056 | Miðvágs komm-una | Ja | Viðarlundin á Tungu |
| 80, Miðvágur | Miðvágur | 199 | Miðvágs kom-muna | Ja | Viðarlundin á Tungu |
| 72, Mikladalur | Mikladalur | 14.991 | Klaksvíkar kommuna | Ja | Viðarlundin í Mikladali |
| 150[a], Sandavágur | Sandavágur | 7.340 | Sandavágs kommuna | Ja | Viðarlundin á Abbreyt |
| 1023[a], Tórshavn | Tórshavn | 12.951 | Føroya landsstýri | Ja | Sjómansskúlatrøðin |
| 1023[b], Tórshavn | Tórshavn | 2.572 | Føroya landsstýri | Ja | Sjómansskúlatrøðin |
| 1025[a], Tórshavn | Tórshavn | 7.315 | Føroya landsstýri | Ja | Müllerstrøð |
| 1026[a], Tórshavn | Tórshavn | 10.077 | Føroya landsstýri | Ja | Debesartrøð |
| 1026[b], Tórshavn | Tórshavn | 5.988 | Føroya landsstýri | Ja | Debesartrøð |
| 1037[a], Tórshavn | Tórshavn | 11.372 | Tórshavnar kommuna | Ja | Viðarlundin úti í Grið |
| 1160[a], Tórshavn | Tórshavn | 282.800 | Tórshavnar kommuna | Ja | Viðarlundin í Havnardali. |
| 1174, Tórshavn | Tórshavn | 10.800 | Tórshavnar kommuna | Ja | Viðarlundin í Marknagili |
| 1177, Tórshavn | Tórshavn | 15.100 | Tórshavnar kommuna | Ja | Viðarlundin í Marknagili |
| 1229, Tórshavn | Tórshavn | 32.100 | Tórshavnar kommuna | Ja | Viðarlundin í Kerjum |
| 1265[u], Tórshavn | Tórshavn | 4.023 | Listafelag Føroya | Ja | Listasavn Føroya |
| 1457[a], Tórshavn | Tórshavn | 2.984 | Anna Maria Færø | Ja | Viðarlundin í Sortudíki |
| 1452[c], Tórshavn | Tórshavn | 16.896 | Kringvarp Føroya | Ja | Viðarlundin í Sortudíki |
| 19, Hoyvík | Tórshavn | 45.300 | Búnaðarstovan | Nei | Viðarlundin í Niðastu Hoydølum |
| 20, Hoyvík | Tórshavn | 4.390 | Búnaðarstovan | Ja | Viðarlundin í Niðastu Hoydølum |
| 784[a], Tórshavn | Tórshavn | 77.173 | Tórshavnar kommuna | Ja | Viðarlundin í Gundadali |
| 152, Trongis- | Trongisvágur | 28.713 | Tvøroyrar | Ja | Viðarlundin í Trongis- |

| Matr. nr. | Býur/bygd | Vídd, m² | Ánari | Skógfriðað | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|---|
| vágur | | | kommuna | | vági |
| 26[a], Froðba | Tvøroyri | 8.583 | Innlendismála-ráðið | Nei | Viðarlundin á Sevmýru. |
| 640, Froðba | Tvøroyri | 1.189 | Innlendismála-ráðið | Nei | Viðarlundin á Sevmýru. |
| 513, Froðba | Tvøroyri | 3.769 | Tvøroyrar kirkja | Ja | Viðarlundin við Kirkjuna á Tvøroyri. |
| 30, Vágur | Vágur | 11.544 | Vágs kommuna | Ja | Plantulendið vesturi á Vatninum. |
| 41, Vágur | Vágur | 18.993 | Vágs kommuna | Ja | Viðarlundin í Hvannadali. |
| 44, Vágur | Vágur | 11.076 | Vágs kommuna | Ja | Viðarlundin í Hvannadali. |
| 18, Hoyvík | Hoyvík | uml. 40.000 | F. landsstýri | Nei | Frílendið Boðanes – Niðastu Hoydalar |
| 1334, Tórshavn | Tórshavn | 11.185 | F. landsstýri | Nei | Frílendið Boðanes – Niðastu Hoydalar |
| 1335 | Tórshavn | uml. 165.000 | F. landsstýri | Nei | Frílendið Boðanes – Niðastu Hoydalar |
| | **Lendi íalt** | **uml. 950.000 m²** | | | |

Fyri lendini, víst í talvu nr. I, er torført at áseta virðini sambært § 20 í kunngerðini um roknskaparverk landsins. Lendini víst í talvu nr. II eru við til at lýsa fyrisitingarligu ábyrgdina, og harvið eisini skyldur, ið áliggja stovninum sambært skógfriðingarservituttinum.

**Skógfriðingarnevndin:**

Við ársbyrjan 2008 var Skógfriðingarnevndin henda: Sigga Rasmussen, formaður, Birgit Arge, Ejler Djurhuus og Jóhann Mortensen. Starvstíðin hjá nevndini var langt síðani liðin, og Innlendismálaráðið tilnevndi tí nýggja Skógfriðingarnevnd í november 08 fyri eitt komandi 6 ára skeið.

Í nývaldu Skógfriðingarnevndini eru: Sigga Rasmussen, formaður, Erika Lómstein Petersen, Turid Madsen, Dánjal Petur Højgaard og Jóhann Mortensen.

Í 2008 helt Skógfriðingarnevndin íalt 5 formligar nevndarfundir. Høvuðsinnihaldið í fundarvirkseminum var av fyrisitingarligum slagi. Nógv málsviðgerð stóðst av hesum virkseminum. Landsskógarvørðurin er skrivari nevndarinnar. Tilfar og áheitanir til Skógfriðingarnevndina verða avgreidd umvegis skrivstovuna á Umhvørvisstovuni.

**Starvsliðið á V&f 2008:**

- Tróndur Leivsson, landsskógarvørður
- Jóna Maria Poulsen, reingerð (á Hvítanesvegi 3)
- Viðarlundir og frílendi:
  - Martin Petersen, røktarleiðari
  - Mortan Mørk, røktari (frá febr.)
  - Morten Christensen, hjálparfólk (fyribilsstarv aug. – des.)
  - Andrias Jens Pauli í Dali, hjálparfólk (í farloyvi frá 1. mai)
  - Leivur Sørensen, røktari (skiftissettur við Lendi frá 1. sept.)
- Gróðurstøðin:
  - Rakul Dam Lindberg, røktarleiðari (í barnsburðarfarloyvi frá mai)
  - Beinta Lamhauge, røktari (aftur úr barnsburðarfarloyvi í febr.) – virkandi røktarleiðari frá mai
  - Hildur Nielsen, røktari (í barnsburðarfarloyvi frá sept.)
  - Vár í Ólastovu Árnastein, gartnaralærlingur (á yrkisskúla í DK okt. – des.)
- Summarhjálp og starvsvenjing
  - 2 ungdómar úr 9. flokki í Eysturskúlanum í starvsvenjing í sept. (ávikavist 2 og 1 viku).
  - 4 ungdómar í fyrifallandi arbeiði á Gróðurstøðini um summarið
- Ung í arbeiði frá Tórshavnar kommunu:
  - 2 hold á uml. 8 ungdómar vóru á Gróðurstøðini í ávikavist viku 27-28 og í 29-30 (Beinta Lamhauge leiðari).
  - 2 hold á uml. 8 ungdómar vóru í viðarlundunum í ávikavist viku 27-28 og í 29-30 (Sørin Sørinsen leiðari).
  - Viðskiftafólk hjá Almannastovuni og ALV vóru í styttri starvsvenjing á Gróðurstøðini.

**Gróðurstøðin:**

Eginframleiðslan av plantutilfari hevur gingið væl, og er í menning. Serligur dentur verður lagdur á at ala fram úr slíkum plantutilfari, sum vísir seg at vera vælegnað til okkara vakstrarlíkindi, og sum samstundis ikki er atgongt gjøgnum handilsligar veitarar uttanlands. Eisini verður arbeitt við at ala upp føroyskan upprunaviðarvøkstur, bæði til søluendamál og til eginnýtslu í royndum v.m. Plantur vórðu í 08 harumframt keyptar úr Íslandi, Skotlandi og Danmark (bæði til nýtslu í plantusøluni á Gróðurstøðini til útseting í viðarlundunum v.m.).
Í plantusøluni vóru íalt uml. 160 ymisk sløg av plantum í útboði gjøgnum árið. Av hesum vóru knapt 70 sløg eginframleidd.
Kundaavgreiðslurnar á Gróðurstøðini (smásølan) vóru sbrt. kassauppgerðunum uml. 1.200 í tali fyri alt árið (uml. 475 við kontantgjaldi og uml. 725 við gjaldskorti). Útskrivaðar vórðu eisini rokningar til kreditsølukundar (vinnukundar, kommunur v.m.).
Nýggj roynd varð gjørd at fáa í lag vegetativa aling av *Nothofagus sp.* tilfari frá summarstiklingum (úrslitið sæst á várið 09). Veðurlíkindini vóru góð fyri summarið og heystið 08, soleiðis at gróðurin var góður, og væl kom burtur úr fræsankan o.tíl. M.a. varð stigabilurin hjá Tórshavnar sløkkiliði royndur til væleydnaða fræsankan av *Alnus rubra* í viðarlundini í Gundadali. Umhugsað eigur at verða, hvørt V&f hevur orku til at fara undir ein altjóða *Index seminum* lista fyri viðarvøkstur í Føroyum. Meira orka tørvar til gerð av sølutilfari um plantur, plantuhandfaring og plantunýtslu í Føroyum.

**Viðarlundirnar v.m.:**

Upptøka av falnum og skaddum trøum v.m. eftir ódnarveðrini í jan. – februar fór við tí mesta av arbeiðsorkuni fram til páskirnar. Her var serliga arbeitt í viðarlundunum í Gundadali, Niðastu Hoydølum og á Selatrað.
Váringin var í høvuðsheitum planting í viðarlundini í Trongisvági, úti í Grøv í Klaksvík, við Sjatlá í Vatnsoyrum, Marknagili og Kerjum í Havn, Langadali í Hoyvík, og í Kunoy.
Summararbeiðið var í høvuðsheitum grassláttur og annað røktararbeiði á frílendunum, vit varða av í Havn og í Hoyvík.
Heyst og vetrararbeiðið hevur í høvuðsheitum verið træ- og lendisrøkt í viðarlundini í Gundadali og á Selatrað. Nakað av jólatrøum og prýðisgreinum varð heystað.
Í samstavi við Tórshavnar kommunu, lendisdeildina, varð farið undir eina roynd við solding av avgrevstri til nýtslujarðildi. Arbeitt var á Boðanesi og í viðarlundini úti í Marknagili. Undir ávísum fortreytum (hampiliga turr, eyrkend jørð) er hátturin væl nýtiligur (nøgd/tíð) og tilfarið úr solduni er frálíkt.
Gøtan frá gl. grótbrotinum á Boðanesi og oman á Boðanesgjógv varð gjørd liðug í apríl/mai (eisini rørslutarnað kunnu nýta hana).
Nýggjur transportari (lendistraktorur), ið varð ordraður í 2007, kom í vinnu í mars.
Oknaparið kom við 4 ungum 19. mai. Á Eiði kom eisini eitt oknapar út við 2 ungum seinni á sumrinum. Steggin í tí førinum er ein av okkara ungum frá 2005, meðan bøgan er villini fuglur. Endurbøtingin av stovninum tykist tí at vera í gongd.
Forsummarið var ógvuliga turt, og 22. mai var skógareldur í viðarlundini í Gundadali, helst ásettur av ósketni við sigarettum e.l. Tíbetur var sløkkiliðið skjótt á staðnum og basti eldinum, áðrenn munandi skaði var hendur á viðarvøksturin.
29. aug., harafturímóti, var so herviligt áarføri, at nakað av skaða stóðst á lendi í viðarlundini í Marknagili og á Gróðurstøðini í Hoydølum.
Í aug./sept. framdu ótangar tíverri munandi herverk á trøini í viðarlundini á Tungu í Miðvági.
Ógvisligt kavaódnarveður var longu 28. okt., men tíbetur førdi hetta bert smávegis skaða við sær á vøksturin.
Ein kundi hevur í heyst umbiðið saging av uml. 30 SEV-pelum á sagulaðnum.
18. des. var, uttan úrslit, leitað í øllum viðarlundunum í Havn og í Hoyvík eftir eini horvnari konu. Leitað varð sbrt. avtalu við sýslumannin, ið stóð fyri leitingini.
19. des. skipaði V&f fyri jólahugna á Gróðurstøðini fyri starvsliðinum á US.
Í 2008 hevur V&f rikið viðarlundirnar hjá Tórshavnar kommunu móti endurrindan av útreiðslunum. Hetta hevur eydnast væl, og hildið verður fram í 2009.

**Ummæli av umsóknum frá IMR:**

IMR sendi V&f íalt 18 umsóknir til ummælis sbrt. ávikavist Reglugerð fyri stuðul til frama fyri viðarvøkstri og Reglugerð fyri stuðul av játtanini til umhvørvis- og náttúruverndartiltøk. Allar umsóknirnar fingu málsviðgerð, og eftir tørvi varð kunning fingin til vega um tey staðbundnu viðurskiftini, ið mett vórðu at vera av týdningi fyri dygdina av ummælunum. Ummælið varð sent IMR 27. juni 2008.

**Skúlavitjanir, kunning o.til.:**
Týskur skógarfrøðingur frá universitetinum í Gøttingen vitjaði í januar at kunna seg við viðarvøkstur í Føroyum. Eisini vitjanir av starvsfeløgum úr m.a. Danmark og Íslandi seinni á árinum. Kunning fyri svenskum tíðindamanni í juni (rættlestur av grein í nov.).
Sjónvarpsprát í febr. um illveðrið í jan.-febr. og tess árin á trøini. Úvarpsprát um sama í mars, og um onnur frílendi í des. Blaðsamrøður um viðarlundir í apríl og aug.
Kunningarframløgu og rundvísing um við og viðarvøkstur fyri næmingum á Tekniska skúla í Tórshavn (12 næmingar á timburdeildini í apríl og 17 byggitøkninganæmingum í aug.). Rundferð í viðarlundini í Gundadali fyri næmingum í Frítíðarskúlanum í Badmintonhøllini ávikavist 3 nov. (30 børn) og 10. nov. (15 børn).
Annika Olsen, landsstýriskvinna í Innlendismálum, vitjaði á Gróðurstøðini 14. okt.

**Norðurlendskt samstarv v.m.:**
IMR hevur tilnevnt landsskógarvørðin føroyskan eygleiðara í stýrið fyri norðurlendska granskingarráðið SamNordisk Skogforskning (SNS). Tróndur tók lut á hálvársfundinum í SNS stýrinum 20. – 22. mai á Gotlandi. Høvuðsevnini á fundinum vóru fyrireiking av EFINORD deild, viðtøkubroytingar fyri SNS, verandi granskingarverkætlanir og netverk, kunning frá NMR, roknkaparmál, javnstøða, samstarv við NICe, fyrireiking av ministarafundi í Íslandi í august. Tróndur mátti geva avboð til seinna hálvársfundin 12. – 14. nov. í Tartu í Estlandi (høvuðsevnini vóru: uppfylging av EFINORD, NMR info, samstarv við NORDFORSK og NICE, játtan av studningi til innkomnar umsóknir).

Føroyar hava síðan síðst í 1970-unum verið sjálvstøðugur limur í Nordisk Arboretudvalg (NAU). NAU er samstarv millum starvsfelagar á stovnum, ið fáast við arboretvirksemi (arboret = savn av viðarvøkstri til granskingar-, framvísingar- og undirvísingarendamál). NAU er netverk undir SNS. Ársfundurin 2008 var í norður Finnlandi, fyriskipaður av starvsfeløgum frá Botanical Gardens, University of Oulu, og við fakligari sýnsferð norður á leiðirnar við Rovaniemi. Tróndur tók lut á ársfundinum í NAU saman við Tóri í Hoyvík, býargartnara hjá Tórshavnar kommunu, við framløguni *"Indigenous dendrovegetation in the Faroe Islands – status, and some examples with allochthonous material"*.

**Tvørfakligt samstarv v.m.:**
Í farna árinum hevur formligt samstarv verið við fyrisitingarliga ráðgevan í ítøkiligum málum vegna Skógfriðingarnevndina. Upprit varð latið til Vernd á heysti 08 viðvíkjandi møguleikum fyri $CO_2$ binding í Føroyum við nýtslu av viðarvøkstri. Arbeiðsbólkurin viðvíkjandi skipan av almennu frílendisøkjunum av Boðanesi í Hoydalar hevur 3 limir frá US (Tróndur, Petur og Ronnie) og 2 frá Tórshavnar kommunu (Tóri í Hoyvík og Mikael Viderø).

Tróndur varð í 2003 tilnevndur limur í Gentilfeingisnevndini hjá Vinnumálaráðnum. Nevndin hevði 4. nov. 08 fund við leiðsluna í FISK og Jacob Vestergaard, landsstýrismann, ið nú umsitur landbúnaðarmál. Tróndur vegleiddi í hesum sambandi somuleiðis 4 Jordbrugsteknologlesandi úr Danmark, tá hesi í nov. vitjaðu í Føroyum (við stuðli frá FISK) at kunna seg um varðveitingararbeiðið viðvíkjandi gomlum føroyskum húsdjórum.

**Annað samstarv/kunningarvirksemi:**
Lions Club Tórshavn hevði sítt árliga jólatiltak í viðarlundini í Gundadali tann 30. nov. (1. sunnudag í advent). Hetta var 20. ferð, at tiltakið var hildið. Tilfarið, teir selja, er úr viðarlundunum, og undirtøkan var sum altíð góð.

Tórshavnar Súkklufelag søkti og fekk loyvi at nýta frílendisgøturnar í Hoydølum og oman á Boðanes til fjallasúkklukapping 28. sept. og til triathlonkapping 4. okt.

Vinnararnir av First Lego League kappingini 2007 (Skála) arbeiddu í samband við 2008 kappingina við spurninginum um trø/skógir og $CO_2$ binding. Tey fingu í hesum sambandi plantugávu (uml. 100 smá trø, eftir umbøn) at lata øllum luttakarunum í høvuðskappingini sum minnisgávu.

Samstarvað við  Marjun Arge Simonsen, málfrøðing, í des. at viðmerkja og rættlesa kunningartilfar, ið hon ger fyri Tórshavnar kommunu um frílendini í økinum Hoyvík - Boðanes - Hoydalar – Ternuryggur.

Heilt fitt av ráðgevingar- og vegleiðingararbeiði hevur í 08 verið sum uppfylging av fleiri av teimum verkætlanum, ið hava fingið stuðul frá IMR til planting av viðarvøkstri. Her kann serliga verða trivið í ætlanina hjá Dánjal Jespersen í Havnardali, hana hjá Þorkeris kommunu í Mýrdali og verkætlanina hjá Bíggjarbata í Bø.

Havnar Sjónleikarafelag fekk í heyst nógv av viðarbulum og øðrum viðartilfari til pallsmíðið av sjónleikinum Klintrimús.

V& f hevði 5 tíðindastubbar á www.us.fo í 2008.

# Fylgiskjal 1
# Visión og arbeiðsøkið

Visiónin hjá stovninum er, at vera ein virkin fyrisiting við fremsta serkunnleika innan tey ábyrgdarøki, sum stovnurin røkir.

Missiónin hjá stovninum er:
- at virka fyri burðardyggari samfelagsmenning við at verja vistskipanir, røkja náttúrutilfeingið og gera rættarbundnar staðfestingar
- at samskipa kort og skrásetingar, veita tænastur, hava lendisumsiting og taka fyrisitingaravgerðir
- at fremja gransking, kunning og hugburðsmenning innan lógarásett virkisøkir.

Fylgjandi endamál eru uppsett fyri stovnin:

- Stovnurin skal lýsa, skráseta og varðveita føroyskt náttúrutilfeingi
- Stovnurin skal fremja samskipan og dagføring av kortum og skrásetingum
- Stovnurin skal fremja kunning og upplýsing innan virkisøkið, herundir:
    - Vísa føroyskar møguleikar fyri plantu- og viðarvøkstri
    - Skapa føroyskar náttúruupplivingar
    - Vísa á møguleikar at avmarka dálking
    - Kunna um náttúru- og umhvørvisvernd
- Veita dygdargóða umsiting og menning av náttúru- og brúkslendum
- Fyrisita lendis-, náttúru- og umhvørvisverndarøkið
- Fremja burðardygga lendisætlan fyri alt landið
- Menna gransking innan virkisøkið

Fyri at fremja endamálið, verður stovnurin skipaður soleiðis, at umstøður verða fyri, at

- Menna skjóta og opna fyrisiting innan virkisøkið
    - Fakliga kompetent málsviðgerð skal tryggjast
    - Pappírsleysar skipanir og sjálvavgreiðsla skal mennast
- Brúkarar skulu fáa góða og álítandi tænastu
- Stovnurin skal verða eitt attraktivt og mennandi arbeiðspláss

*Lýsing av samanløgdu stovnunum*
Matrikulstovan var upprunaliga skipað í 1948 og hevði bygt sítt virksemi á ll. um matrikulering og sundurbýti v.m. frá 11. desembur 1962. Tinglýsing hevur verið fyrisitin av dómara-skrivstovuni fram til 2006, tá tað varð flutt til serstaka Tinglýsingarstovu, sum hevði sum endamál at føra øll skjøl viðvíkjandi ognum inn í dagbók og tingbók eftir føstum reglum, serliga samsvarandi ll. um tinglýsing frá 16. august 1962. Landsfólkayvirlitið hevur seinnu árini verið umsitið av Innlendismálaráðnum. Virksemið byggir á ll. um fólkayvirlit frá 8. mai 2007. Skógrøkt landsins virkar sambært løgtingslóg nr. 53 um viðarlundir frá 27. november 1952. Høvuðsuppgávan var at røkja gamlar og nýggjar viðarlundir. Umhvørvisdeildin hevði verið partur av Heilsufrøðiligu starvsstovuni síðan 1989. Virksemið byggir fyrst og fremst á ll. um umhvørvisvernd frá 29. oktobur 1988 og ll. um havumhvørvi frá 17. mai 2005.

**Fylgiskjal 2:**
**Organogram fyri samanlagda stovnin**



# Fylgiskjal 3:
# Umhvørvisstovan
– virksemið á stovninum

Umhvørvisstovan fevnir um virkisøkini *Vernd, Lendi, Kort&Skráir, Gransking&Menning, Viðarvøkstur&frílendi og Skrivstovusamskipan*. Innan skrivstovusamskipanina fevnir Umhvørvisstovan um *Tinglýsing og Fólkayvirlit.*

Umhvørvisstovan virkar fyri burðardyggari samfelagsmenning við at verja vistskipanir, røkja náttúrutilfeingið og gera rættarbundnar staðfestingar. Umhvørvisstovan hevur matrikul- og verndarfyrisiting, samskipar kort og skrásetingar, veitir tænastur, granskar og skipar fyri framsýningum innan virki stovnsins.

Við at sjónliggera okkara náttúruvirðir og at upplýsa og kunna um náttúru og umhvørvi, virkar Umhvørvisstovan fyri at fremja umhvørvisvinaligan hugburð og stimbra burðardyggari menning.

Umhvørvisstovan virkar fyri at røkja tær altjóða avtalur, sum Føroyar hava sett í gildi. Umhvørvisstovan tekur lut í norðurlendskum og altjóða samstarvi.

Umhvørvisstovan miðar eftir at vera ein virkin fyrisiting við fremsta serkunnleika innan tey ábyrgdarøki, sum stovnurin røkir. Stovnurin sær tað, at kunna borgaran, myndugleikar og áhugabólkar, sum ein týðandi lut í virksemi stovnsins, og verður hetta millum annað gjørt gjøgnum eina virkna heimasíðu – www.us.fo.

Umframt nýggj virkisøki og tænastur, røkir Umhvørvisstovan tær uppgávur, ið fyrr vóru á Matrikulstovuni, Tinglýsingarstovuni, Landsfólkayvirlitinum, Skógrøkt Landsins og Umhvørvisdeildini á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Hesir stovnar vórðu á sumri 2007 lagdir saman í ein stovn: Umhvørvisstovan.

## Virkisøkini á Umhvørvisstovuni

## Vernd
Endamálið við virkisøkinum *Vernd* er at varðveita eitt ódálkað umhvørvi við einum fjøltáttaðum plantu- og djóralívi. Tað verður gjørt við at verja náttúruna móti skemmandi og skaðiligum inntrivum og at fyribyrgja og avmarka dálking.

*Vernd* fyrisitur lóggávu á náttúru- og umhvørvisøkinum og vil tryggja, at henda lóggáva verður hildin. Arbeitt verður fram móti, at fyrisitingin á náttúru- og umhvørvisøkinum er í samsvari við altjóða ásetingar.

Arbeiðið hjá *Vernd* :

- Góðkenna og hava eftirlit við virkjum og virksemi, herundir brennistøðir, tyrvingarpláss, alistøðir, orkuverk, sláturvirki, frálandavirksemi og aftursøkking.
- Hava eftirlit við kommunalum virksemi, so sum svimjihyljum og bingjuplássum
- Ásetingar og treytir fyri kommunalum spillivatnleiðingum
- Gera støðulýsingar av náttúruni
- Hava eftirlit við dálkingarstøðuni og kortleggja dálkingarkeldur
- Seta í verk eina náttúruverndarfyrisiting
- Ráðgeva um náttúru- og umhvørvismál
- Geva náttúruverndartengd veiðu- og útflutningsloyvi
- Gera lógaruppskot, kunngerðauppskot og vegleiðingar
- Viðgera og taka støðu til kærur
- Savna og skipa hagtøl
- Taka lut í altjóða- og norðurlendskum samstarvi
- Kunna um náttúru og umhvørvi

## Lendi

Uppgávan hjá *Lendi* er at umsita galdandi matrikul, sum er matrikulskráin og -kortið, og at virka fyri samskipaðari lendisplanlegging. Hetta fevnir um at fremja sundurbýti, samanleggingar, marknaumskipanir, -umbýti, og marknasetingar. Eisini fevnir hetta um, at luttaka í ger av yvirskipaðum lendisætlanum fyri landið samsvarandi teirri lendisplanlegging, sum umhvørvislóggáva og byggi- og kommunuplanlóggáva umfata. Eisini tekur *Lendi* sær av at gera útskiftingar.

Arbeiðið hjá *Lendi*:

- Góðkenna og/ella nokta matrikulerar broytingar
- Umsita matrikulskránna og matrikulkortið
- Tinglýsa góðkendar broytingar
- Avgreiða mál um eigaraíbúðir
- Gera uppmálingar og marknasetingar
- Luttaka í viðgerð av býarskipanarmálum
- Savna og dagføra góðkendar býarætlanir
- Tilmæli í.s.v. kærur
- Skipa og savna hagtøl
- Taka lut í norðurlendskum samstarvi
- Ráðgeva og kunna myndugleikar, borgarar og áhugabólkar

## Kort & Skráir

*Kort & Skráir* er serfrøðin innan kort og geodáta, og aðaluppgávan er at fáa til vega tað geografiska tilfar, sum krevst fyri at kunna taka rættar fyrisitingarligar avgerðir - fyrst og fremst á Umhvørvisstovuni, men eisini hjá lands- og kommunuumsitingini. Tilfarið skal eisini vera til gagns fyri fyritøkur og borgarar.

Arbeiðið hjá *Kort & Skráir*:

- Umsita geodætiska grundarlagið - tryggja eitt fixpunktsgrundarlag, sum lýkur tey krøv, sum uppmátingartøkni setur
- Hava ábyrgdina av at velja forrit, uppseting, brúk og upplæring
- Fyriskipa regluliga fotoflúgving
- Framleiða grundkort eftir bílegging
- Framleiða myndakort eftir bílegging
- Umsita og dagføra topografisk kortverk
- Skipa fyri, at landsdekkandi talgild lendismodell (DTM) og yvirflatumodell (DSM) verða gjørd
- Fyriskipa temakort – matrikulkort, byggisamtyktir, náttúrufriðing, fornminnisfriðing við meira
- Umsita landsadressuskránna
- Í samstarvi við onnur samskipa matrikulskrá, adressuskrá, tinglýsingarskrá og fólkaskrá
- Telduvegleiðing og netumsiting
- KT-skipanir, leiðbeina og stuðla í KT-nýtslu

## Gransking&Menning

Virkisøkið *Gransking&Menning* fevnir um vitanarkjarnar innan serstøk økir sum Umhvørvisstovan hevur tørv á. Í fyrstu atløgu er skipaður ein kjarni viðvíkjandi umhvørvisdálkandi evnum og árini av hesum.

Uppgávan er at granska í føroysku náttúruni, serliga við atliti til mannaelvdar broytingar og árini av dálking og inntrivi í náttúruni.

*Gransking* umsitur og mennir vitan um náttúru og umhvørvi og er við til at mynda tað fakliga grundarlagið í umsitingarmálum. Eftir avtalu ger granskingardepilin árinskanningar og aðrar serstakar kanningar.

Arbeiðið hjá *Gransking&Menning*:

- Gera og fremja ætlanir fyri eftiransing av umhvørvisdálkandi evnum
- Ráðgeva um náttúrufyribrigdi, dálking og árin
- Gera árins- og støðiskanningar
- Granska í útbreiðslan av umhvørviseitrandi evnum og árin av hesi.
- Vegleiða í sambandi við Bachelor, Cand.scient og Ph.D. verkætlanir
- Taka lut í altjóða- og norðurlendskum samstarvi
- Kunna breitt um granskingarúrslit
- Umsita umhvørvissynisbanka

## Viðarvøkstur & frílendi

Uppgávan hjá virkisøkinum *Viðarvøkstri & frílendi* er at vera tann útinnandi deildin á Umhvørvisstovuni í málum um umsiting av almennum jarðum. Tað fevnir eitt nú um røkt, rakstur og menning av náttúrulendum, viðarlundum, urtagarðsbrúki, útilívi, náttúruferðavinnu, veiðu & frítíðarfiskaríi.

Arbeiðið hjá *Viðarvøkstri & frílendi*:

- Veita útbúgvingar-, royndar- og menningarmøguleikar til tann grøna sektorin
- Umsita, røkja og menna skógfriðaðar viðarlundir í samstarvi við Skógfriðingarnevndina
- Umsita, røkja og menna onnur viðarlundarmál, til dømis $CO_2$ binding, lívdarplanting og trivnaðar- og heilsuplantingar
- Umsita, røkja og menna frílendi og náttúrufriðaði lendi
- Menna plantualingina og -framleiðsluna á Gróðurstøðini
- Menna vísindaliga arbeiðið við royndum av trøum, runnum og øðrum vøkstri
- Menna royndir innan lendisrøkt, lendisskipan, arbeiðsútgerð v.m.
- Selja plantur v.m.
- Samstarva við myndugleikar og sektorar við felags markamóti
- Taka lut í norðurlendskum og altjóða samstarvi
- Ráðgeva og kunna myndugleikar, borgarar og áhugabólkar

## Skrivstovusamskipan

Skrivstovusamskipanin umfatar stjórnarmál, tinglýsing, fólkayvirlit og felagsumsiting annars. Virkisøkini á Umhvørvisstovuni hava felags umsiting, sum skal tryggja, at leiðbeining og skráseting er á høgum góðskustigi, soleiðis at stovnurin livir upp til løgtingslóg um fyrisiting. Innan tinglýsing verða framdar almennar staðfestingar av galdandi rættarviðurskiftum og innan fólkaeftirlit verður øll persónsrelaterað staðfesting framd.

Avgreiðslan hevur hesar uppgávur og ábyrgdarøki:

- Telefon- og kundamóttøka
- Leiðbeina viðskiftafólk
- Postmóttøka og skjalaskráseting
- Skipa og avgreiða fyrispurningar
- Rættlesa og senda út post
- Bókhald og fíggjarstýring
- Tinglýsing og ognarskráseting
- Fólkaskráseting
- Umsita fíggjarmál, starvsfólkamál og lógarmál
- Skipa fyri, fyrireika og stuðla tiltøkum, fundum og felagsvirksemi
- Standa fyri goymslu og arkivum
- Skipa persónliga menning hjá starvsfólkum
- Innkeyp, vask, viðlíkahald og rakstur av bygningum









